

Frágreiðing og tilmæli

# Lívsumstøður við niðursettari hoyrn í 2020

HOYR

sjúkrakassagrunnurin

Frágreiðing og tilmæli

# Hvussu eru lívsumstøðurnar hjá fólki, ið hava niðursetta hoyrn í 2020

Copyrigt 2021 ©
Hoyr

**Verkætlanarleiðari**
Majbritt Jacobsen, Cand.mag.pæd

**Vegleiðari**
Ása Róin, Rn, PhD Lektara á deildini fyri Heilsu- og Sjúkarøktarvísindi

Verkætlanin, varð stuðla av Sjúkrakassagrunninum, høvuðsøki 1, og er tann fyrsta av sínum slag í Føroyum.

Endurgevingar úr tekstinum eru loyvdar við týðiligari kelduávísing.

Endurgivin soleiðis: Jacobsen M. (2021). Hvussu eru lívsumstøðurnar hjá fólki, ið hava niðurseta hoyrn. Tórshavn: Hoyr

HOYR sjúkrakassa grunnurin

# Innihald


**1.0 Inngangur** 4

1.1 Gransking á hoyriøkinum 5

1.2 Viðkomandi gransking fyri hesa verkætlan 6

1.3 Felagið Hoyr 6

1.4 Lýsing av spurninginum 6

1.5 Spurningur 6

1.6 Lýsing av heimildarfólkum 6

**2.0 Bygnaðurin í verkætlanini** 10

**3.0 Vísindafatan** 12

3.1 Hálvskipað samrøða 13

3.2 Samrøðu og ljóðskrivingar-tilgongd 13

3.3 Fyrireikan av granskingar- og samrøðuspurningum 14

3.4 Fyribrigdafrøði sum mannagongd 14

3.5 Verkætlanarleiðari 14

3.6 Dátutrygd 15

**4.0 Ymisk og viðkomandi kunning um hoyriøki** 16

4.1 Ymisk áhugafeløg 17

4.2 Tríggjar flokkingar 17

4.3 Líka sum og ymisk 18

4.4 Hoyritól og veitarar 19

4.5 Kunngerð um stuðul til hoyritól 19

4.6 Krøv, ið eru sett privata veitaranum av hoyritólum 19

4.7 Útflýggjan av hoyritólum í 2018 20

4.8 Endi av fyrra parti av verkætlanini 20

**5.0 Heimildarfólkini í verkætlanini** 22

**6.0 Lívsumstøðum** 24

6.1 Tey ungu undir 18 ár siga frá sínum lívsumstøðum 25

6.1.1 Hoyriviðurskiftini í skúlanum 25

6.1.2 Spæl og samspæl 26

6.1.3 Lærararnir og ungu heimildarfólkini 27

6.2 Umstøðurnar hjá ungum undir 18 ár 27

6.3 Fólk millum 18-67 ár siga frá sínum lívsumstøðum 28

6.3.1 Niðursett hoyrn 28

6.3.2 At hava niðursetta hoyrn í almennum høpi 28

6.3.2 At brúka teknikk 28

6.3.3 Samvera og sosial læring 29

6.4 Umstøðurnar hjá fólki millum 18 og 67 ár 30

6.5 Fólk yvir 67 ár siga frá sínum lívsumstøðum 30

6.5.1 Samskifti 30

6.5.2 Niðursett hoyrn 30

6.6 Umstøðurnar hjá fólki yvir 67 ár 31

**7.0 Ábyrgd og atkoma** 32

7.1 Sjónarmið, ið kunnu hava avleiðingar 33

7.2 Greining av ábyrgd 33

**8.0 Svar upp á verkætlanarspurning** 36

**9.0 Grundhugsan um verkætlanar tilgongdina** 40

**10.0 Bibliografi** 46

**11.0 Fylgiskjøl** 50

# 1.0
# Inngangur

Í Føroyum er avmarkað vitan um hoyriøkið. Eingin veit við vissu, hvussu nógv fólk her á landi hava niðursetta hoyrn, nýta hoyritól ella tað, ið serliga hevur áhuga fyri hesa verkætlan, hvussu lívsviðurskiftini eru, og hvørjar avleiðingar niðursetta hoyrnin hevur á gerandisdagin hjá tí einstaka.

Tá ið vit skulu meta um, hvussu nógv hava avbjóðingar við hoyrnini, verður støðið tikið í donskum og altjóða hagtølum, og sambært hesum hagtølum hava einir 8.000 føroyingar, sættihvør føroyingur, eitthvørt hoyribrek (Høreforeningen, 2020).

Tað vil siga, at ein stórur partur av føroyingum hava dagliga avbjóðingar við at hoyra, fylgja við í samrøðum, fylgja við í tíðindaflutningi og vera javnbjóðis partur av samfelagnum.

Sambært altjóða sáttmála um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, og sum hevur verið í gildi í Føroyum síðan 24. juli 2009, hava Føroyar bundið seg til millum annað at ... javnseta møguleikar hjá fólki, ið bera brek ... (Sameindu Tjóða, 2006). (Sameindu Tjóðir) (ST, 2006)

Í grein 9 stendur, at ... fólk, ið bera brek, skulu kunna liva sjálvstøðugt og fullvegis vera við í øllum lívsins viðurskiftum, limalondini skulu seta í verk hóskandi tiltøk til tess at tryggja fólki, ið bera brek, at tey eins væl og onnur sleppa inn í bygningar og framat ymisligum umhvørvi, ferðamøguleikum, upplýsing og samskifti, kunningartøkni, samskiftistøkni og skipanum og øðrum hentleikum og tænastum, sum tøkar eru og verða veittar almenningi, bæði í bý og á bygd ... (Ibid).

## 1.1 GRANSKING Á HOYRIØKINUM

Áhugaverd og viðkomandi gransking er á hoyriøkinum umframt viðgerðarhættir o.a. Ein stór donsk skrásetingarkanning vísir m.a., at hoyrimissur mitt í lívinum økir munandi um vandan fyri at fáa demens. Kanningin vísir eisini, at hetta kann fyribyrgjast við, at niðursetta hoyrnin verður staðfest skjótast gjørligt, og hoyritól verður nýtt dagliga (Merete Osler, 2018). Daglig nýtsla av hoyritóli vísir somuleiðis positiva ávirkan á nervalag og kognitivar førleikar hjá eldri fólki (Sharma, 2020)

Hearing, vision, and lighting conditions among older recipients of home care, er ritgerð hjá Gro Gade Haanes, norskur adjunktur í sjúkraróktarfrøði. Partur av hennara gransking varð gjørdur í Føroyum og í føroyskum viðurskiftum. (Haanes, 2016)

Endamálið við ritgerðini var at kanna hoyri- og sjónbrek hjá eldri fólki, ið fáa heimarøkt dagliga, og í øðrum lagi at staðfesta, um samsvar er millum sjálvsmetaninar hjá teimum eldru samanborið við hoyri– og sjónmátingarnar hjá oyra- og eygnalækna. Niðurstøðan vísti, at hóast tey eldru sjálv hildu, at hoyrn og sjón vóru góð,

vístu royndirnar, at bæði hoyrn og sjón vóru mundandi viknað (Ibid).

Ritgerðin vísir, at niðursett hoyrn og sjón og vánalig ljósviðurskifti kunnu hava við sær virkisafturgongd, afturhald í sosialari luttøku og óhapp í heiminum hjá tí eldra. Fyri at varðveita møguleikan fyri sosialari luttøku so leingi sum til ber, er umráðandi at fáa hoyrn og sjón javnan kannað.

## 1.2 VIÐKOMANDI GRANSKING FYRI HESA VERKÆTLAN

Når hørelsen svigter var ein ein umfatandi empirisk gransking av teimum avleiðingum, sum niðursett hoyrn kann hava á arbeiðslív, útbúgving og trivnað. Viðurskifti, ið vóru kannað, vóru hoyrn, arbeiðsviðurskifti, útbúgving, frítíð, persónlig viðurskifti og inntøka. Kanningin vísti at:

- Niðursett hoyrn er ein forðing fyri fulla luttøku á arbeiðsmarknaðinum og økist alt eftir, hvussu umfatandi niðursetta hoyrnin er.

- Fyribyrging og hjálpitól, ið javnseta fólk við niðursettari hoyrn, økir um møguleikan fyri at varðveita fólk á arbeiðsmarknaðinum og at fáa fólk í starv.

- Fólk, ið hava niðursetta hoyrn, eru oftari fyri sálarórógvi, hava ringar nervar og tunglyndi, og tey troyttast skjótt.

- Triðihvør heldur, at niðursett hoyrn hevur havt negativt árin á teirra møguleikar fyri at liva tað lívið, tey høvdu ynskt sær

- Kunningarstigið í sambandi við tøkni, sosialan stuðul og ráðgeving var ov tilvildarlig. Mælt varð til meiri skipaða og miðvísa kunning, ið kundi avmarka tær negativu avleiðingarnar hjá viðkomandi (Socialforskningsinstituttet, 2003).

Talan er um umfatandi avleiðingar. Tað kundi verið áhugavert at vita, um umstøðurnar eru sambærligar við gerandisdagin í dag, 17 ár seinni. Umráðandi er tó at kanna, um viðurskiftini í Føroyum eru líka so umfatandi, og um so er, at arbeitt verður tilvitað við at bøta um avleiðingarnar.

## 1.3 FELAGIÐ HOYR

Felagið Hoyr varð sett á stovn í 1992 og er eitt áhugafelag fyri fólk, ið hava hoyribrek. Endamálið er at varpa ljós á tær avbjóðingar, sum hoyribrekað hava og at gera tær dagligu umstøðurnar so góðar sum gjørligt. (Hoyr-felagið fyri hoyribrekað í Føroyum, 1992).

## 1.4 LÝSING AV SPURNINGINUM

Við støði í endamálsorðingini hjá felagnum og innlit í verkætlanina hjá Socialforskningsinstituttet, hevur nevndin í Hoyr avgjørt at gera eina kvalitativa verkætlan. Endamálið er at fáa viðkomandi vitan um lívsviðurskiftini hjá fólki við niðursettari hoyrn, og út frá tí meta um, hvørt tørvur er á at tillaga ávís viðurskifti.

Vitanin skal nýtast til at kunna almenningin um lívsviðurskiftini hjá fólki, ið hava niðursetta hoyrn, tað veri seg í skúla, á arbeiðsmarknaðinum og hjá teimum eldru. Soleiðis verður tryggjað, at fólk við niðursettari hoyrn, verða javnsett við tey, sum hoyra, og at leiðsla og skúli og/ella starvsfelagar fáa frálæru í góðum samskiftishættum, góða kunningarstrategi og tílíkt.

## 1.5 SPURNINGUR

Hvussu eru lívsumstøðurnar hjá fólki, ið hava niðursetta hoyrn, og hvørjar avbjóðingar hava tey í gerandisdegnum?

Fyri at kunna svara upp á spurningin, verður skipað fyri samrøðum, har fólk, ið hava niðursetta hoyrn, fáa høvi at siga frá sínum lívsumstøðum og møguligum avbjóðingum í gerandisdegnum.

## 1.6 LÝSING AV HEIMILDARFÓLKUM

Nevndin vil hava innlit í lívsviðurskiftini hjá einum stórum skara, ið dagliga livir við niðursettari hoyrn og sum nýta hoyritól til tess at virka í gerandisdegnum. Tí verður skipað fyri samrøðum við ung undir 18 ár, fólk millum 18 og 67 ár og fólk yvir 67 ár. Hesi verða kallað

Nevndin vil hava innlit í lívsviðurskiftini hjá einum stórum skara, ið dagliga livir við niðursettari hoyrn og sum nýta hoyritól til tess at virka í gerandisdegnum

heimildarfólk og hava sjálv bjóðað seg fram til at vera við í verkætlanini.

Um viðkomandi hevur onnur brek, forðingar og/ella avbjóðingar, ber til at vera við, um so er, at viðkomandi er førur fyri at svara upp á samrøðu-spurningarnar. Tað er uttan mun til nær og hvussu niðursetta hoyrnin er íkomin, ágóði av og slag av hoyritóli, ella hvussu niðursett hoyrnin er.

At hoyrnin er niðursett kann hava rættiliga ójavna ávirkan hjá tí einstaka. Tað er ymist nær og hvussu hoyritrupulleikin er íkomin. Fólk kunnu hava ymiskan tørv á tí at hoyra, og ymist er hvønn ágóða fólk hava av hoyritólum.

Hoyritrupulleikar kunnu vera arvaligir, íkomnir í uppvøkstrinum ella í aldurdóminum. Teir kunnu koma líðandi ella brádliga, kunnu vera arvaligir ella ikki, kunnu vera pre- ella postlingual, t.v.s. hoyritrupulleikarnir er komnir fyri ella eftir málmenningina og kunnu koma á øðrum ella báðum oyrum o.s.fr. (Socialstyrelsen, 2020)

Hvørt av hesum hevur við sær sínar serstøku avleiðingar, sum ikki eru í miðdeplinum í hesi verkætlan, og hoyritrupulleikin kann vera størri ella minni partur av øðrum menningar- og/ella rørslubreki.





# 2.0

# Bygnaðurin í verkætlanini

# Heimildarfólkini vóru millum níggju og 91 ár, fýra menn og sjey kvinnur

Í hesum kapitlinum verður bygnaðurin í verkætlanini lýstur.

Í triðja kapitli verður greitt frá vísindaliga støðinum, ið er grundarlagið undir verkætlanini, nýtslu av hálvskipaðum samrøðum, og hvussu granskingar- og samrøðuspurningarnir vórðu lagdir til rættis.

Í fjórða kapitli verður greitt frá ymsum viðurskiftum, ið eru knýtt at hoyriøkinum.

Í fimta kapitli er ein neyv lýsing av heimildarfólkunum, ið sjálv bjóðaðu seg fram til verkætlanina. Heimildarfólkini vóru millum níggju og 91 ár, fýra menn og sjey kvinnur. Samrøðurnar vóru í tíðarskeiðnum oktober-november 2020.

Í sætta, sjeynda og áttanda kapitli verða útsagnirnar hjá heimildarfólkum greinaðar og at enda svaraðar.

# 3.0
# Vísindafatan

Fyribrigdafrøði verður nýtt sum stevna og háttalag. Fyribrigdafrøði er úr grikska orðinum phainomenon og merkir tað, ið vísir seg og orðið logos í merkir læra. Fyribrigdafrøði er sostatt læran um tað, ið vísir seg fyri tilvitskuna (Bo Jacobsen, 2010, s. 185).

Í fyribrigdafrøði er lívsverðin eitt týðandi hugtak. Lívsverðin er gerandisdagurin, har fólk liva og láta uttan at geva sær far um vísindalig sjónarmið og týdning annars. Við at fáa innlit í lívsverðina hjá heimildarfólkum, koma viðkomandi fyribrigdi fram, og hesi fyribrigdi geva svarið upp á verkætlanarspurningin (Ibid).

## 3.1 HÁLVSKIPAÐ SAMRØÐA

Ein nógv nýttur háttur í hug- og samfelagsvísindum fyri at fáa innlit í lívsviðurskifti hjá heimildarfólkum er granskingarsamrøður.
Ein granskingarsamrøða kann vera lutfalsliga óskipað, hálvskipað ella stýrd, tó at hon altíð tekur støði í tí vitan, granskarin vil hava. Hvør av hesum hættum hevur sína tilgongd og sostatt úrslit.

Í hesi verkætlan verður tann hálvskipaða samrøðan nýtt. Tann hálvskipaða samrøðan er so mikið opin, at einstaka heimildafólkið kann koma inn upp á viðurskifti, upplivingar ella annað, ið kunnu vísa seg at gerast av stórum týdningi fyri vitanina um hoyriøkið.

Við tað at samrøðan er hálvskipað, ber til at stýra samrøðuni og tryggja eina so nágreiniliga og avmarkaða vitan um tað at liva við niðursettari hoyrn, at samrøðan kann verða partur av greiningararbeiði og soleiðis kann nýtast til at orða eina samanhangandi og umboðandi triðjapersónslýsing (Tanggaard, 2010).

## 3.2 SAMRØÐU OG LJÓÐSKRIVINGARTILGONGD

Tann hálvskipaða samrøðan, ið verður tikin upp á diktafon og síðani ljóðskrivingartilgongdin taka støði í samskiftisgreiningini hjá Jacob Steensig. Steensig lýsir tíggju meginreglur, ið eiga at vera støðið undir allari samrøðugreining, umframt seks stig, sum granskarin skal hugsa um í gongdini frá tí, at verkætlanin fer í gongd, og til tað endaliga úrslitið er greitt.

Hesar meginreglur snúgva seg um fatan, førleikar, upptøku, ljóðskriving, virki, konstruktión, projektión, forrættindi o.a. Meðan stigini snúgva seg um, hvussu data verður savnað, hvat endamálið er, hvussu ein kann tryggja so álítandi data sum til ber, umframt interaktiónstýpu og etikk. Hetta eru krøv, sum verkætlanarleiðari setir til tess at tryggja so eftirfarandi samrøðu og ljóðskrivingartilfar sum gjørligt (Steensig, 2009).

## 3.3 FYRIREIKAN AV GRANSKINGAR- OG SAMRØÐUSPURNINGUM

At tryggja ta nágreiniligu og avmarkaðu vitanina, vóru ávísir granskingarspurningar orðaðir, ið vóru støðið undir samrøðuspurningunum, sum vóru nýttir (sí fylgiskjal nr. 1).

Spurningarnir kunnu býtast í fýra: tann inneftirlýtandi fatanin, sum viðkomandi hevur av tí at liva við niðursettari hoyrn. Tann úteftirlýtandi fatanin, sum er umhvørvið og tey sosialu sambondini. Triði parturin er heildin, sjálvsfatan, tilvitan um møguleikar og líknandi. Og til seinast um heimildarfólk hava tilmælir og/ella aðrar viðmerkingar (Tanggaard, 2010, s. 39).

## 3.4 FYRIBRIGDAFRØÐI SUM MANNAGONGD

Tað ljóðskrivaða tilfarið verður greinað út frá mannagongdini hjá Amedeo P. Giorgi og Barbro M. Giorgi frá 2008 og Ernesto Spinelli, frá 2005 (Bo Jacobsen, 2010, s. 196-197).

Giorgi og Giorgi skriva ítøkiliga, hvussu granskarin setir seg í eina fyribrigdafrøðiliga støðu, t.v.s. at viðkomandi skal vera tilvitaður um egna forfatan og í mest møguligan mun vera opin um tilfarið. Granskarin skal lesa tað ljóðskrivaða tilfarið ígjøgnum fleiri ferðir við tí eindamáli at finna meiningsgevandi eind og heild.

Síðan skal granskarin fara aftur í tilfarið og leita eftir bólkum og hugtøkum, ið kunnu hava týdning. Tær samlaðu eindirnar skapa málsliga sæð eitt mynstur, ið lýsir fyribrigdini í lívinum hjá heimildarfólkunum. Endamálið við mannagongdini er at finna tað vanliga í ítøkiligu frágreiðingini hjá heimildarfólkunum við fyribrigdafrøðiligum amboðum.

Spinelli vísir til fyribrigdafrøðiliga avmarking. Tað er, at granskarin skal seta sínar egnu vánir, vitan og forvitan í parantes og vera opin um ta ítøkiligu og serstøku lívsverð, ein fær innlit í. Hetta verður kallað ein parantesregla og kann knýtast at tí, sum ungi Husserl fekk átalu fyri. Husserl nýtti hugtakið transcendental avmarking, har granskarin skal síggja burtur frá vitan, bæði almennari og ástøðiligari vitan sum ein roynd at møta víðskygdur í sjálvari samrøðuni. Husserl broytti seinni avmarkingina til parantesreglur, og hesar vísir Spinelli til. Tað merkir, at granskarin skal vera tilvitaður um og lýsa sína vitan, forfatan og líknandi og soleiðis kann seta parantes um og møta heimildarfólkunum við tilvitaðum opinleika.

Víðari skal granskarin sambært Spinelli lýsa og ikki greiða frá. Fyribrigdini skulu lýsast uttan tulking og frágreiðingar, men skrivast so neyvt, sansaliga og nágreiniliga sum til ber.

Allar útsagnir hava javnt stóran týdning. Útsagnirnar skulu standa líka týdningarmiklar sum gjørligt, og umráðandi er, at granskarin ikki leggur eitt prematurmynstur yvir tilfarið. Hetta verður kallað ekvivaliseringsreglan ella javnvirðisreglan (Bo Jacobsen, 2010).

## 3.5 VERKÆTLANARLEIÐARI

Verkætlanarleiðari hevur niðursetta hoyrn og nýtir hoyritól. Í tíðarskeiðnum 2000 til 2004 starvaðist viðkomandi sum námsfrøðingur við deyvum børnum og hevur verið forkvinna í felagnum Hoyr í trý ár.

Hesar royndir geva persónligt og fakligt innlit í hoyriøkið, vitan um tvørrandi hagtøl, kunning og menning á økinum. Hetta krevur tilvitan í sambandi við tað vísindaliga arbeiði, og til tess at tryggja so óheft vísindi sum til ber er verkætlanarleiðari tilvitaður um egnu vitan og forfatan og vil vera tilvitaður um sín samskapandi leiklut í samrøðunum. Heimildarfólkini verða kunnað um, at verkætlanarleiðarin tosar við opnum sinni og tilvitaðum naiviteti, samstundis sum nýtsla av viðurkenning, nikk, smíl ella misnøgd, keipum, kropsmáli og tílíkum verður avmarkað mest møguliga (Bo Jacobsen, 2010).

„Allar útsagnir hava javnt stóran týdning. Útsagnirnar skulu standa líka týdningarmiklar sum gjørligt ...“

### 3.6 DÁTUTRYGD

Verkætlanin er gjørd sambært reglugerð fyri persónsupplýsingarlógina og Dátueftirlitið. Lýst varð á facebooksíðuni hjá Hoyr eftir heimildarfólki við upplýsing um, at fólk, ið vildu vera við, kundu seta seg í samband við verkætlanarleiðara, sum í fyrsta umfari skrásetti viðkomandi. Tá ið nóg nógv fólk vóru at velja ímillum til tess at tryggja umboðan úr øllum landinum, aldur og kyn, fingu heimildarfólk nærri kunning um verkætlanina í kunningarskrivi (fylgiskjal 2) og váttaðu í samtykkisskrivi (fylgiskjal 3) , at samrøðan varð tikin upp á diktafon, ljóðskrivað og nýtt í greiningararbeiðinum.

Í greiningar- og skrivliga arbeiðinum varð tryggjað, at heimildarfólk í ongum føri verða kend aftur, og at einki kann sporast aftur til viðkomandi. Øll skjøl, ið vóru nýtt í verkætlanini, vórðu burturbeind við makulering 31. desember 2020. Heimildarfólk kunnu altíð taka samtykkið aftur fyri framtíðina, og leiðbeining er um, hvussu hetta kann gerast.

Her endar vísindaliga frágreiðingin, og nú verða ymisk viðurskifti, ið eru knýtt at hoyriøkinum, lýst.

# 4.0

# Ymisk og viðkomandi kunning um hoyriøki

## 4.1 YMISK ÁHUGAFELØG

Tvey áhugafeløg, ið javnan verða blandað, eru Deyvafelag Føroya og Felagið Hoyr. Orsøkin er helst tann, at bæði hava eitthvørt við oyruni og hoyrn at gera. Tó er talan um ymisk fokusøki.

Deyvafelag Føroya varð sett á stovn í 1972 og nýtir teknmál sum fyrsta mál. Felagið hevur til endamáls at savna deyv í Føroyum, umframt at varpa ljós á og arbeiða fyri, at deyv fólk í Føroyum hava somu rættindir sum hoyrandi fólk. Felagið hevði 31. januar 2021 umleið 30 aktivar limir og 500 stuðlandi limir (Deyvafelag Føroya, 2020).

Hoyr – felagið fyri hoyribrekað í Føroyum, sum seinni er broytt til Hoyr – varð sum nevnt stovnað í 1992 og virkar fyri, at tær dagligu umstøðurnar hjá fólki, ið hava hoyribrek, skulu verða so góðar sum til ber og at upplýsa samfelagið um trupulleikarnar hjá hesum fólki, við atliti at bøttum hoyriumstøðum hjá øllum sløgum av hoyritrupulleikum, tað veri seg niðursett hoyrn, tinnitus[7], menières[8], BaHa og Cochlaer Implantbrúkarum. Niðursett hoyrn, BaHa og Cochlaer Implant, verða lýst nærri. Felagið hevði pr. 31. jan. 2021, 72 limir.

Harumframt hevur foreldrafelagið Hoyrnin verið meir og minni virkið gjøgnum árini. Tað var sett á stovn í samstarvi við Deyvafelag Føroya í 1981 og er óvirkið í løtuni.

## 4.2 TRÍGGJAR FLOKKINGAR

Yvirskipað verður skilt ímillum, um fólk eru deyv, eisini kallað deyvfødd, deyvblivin, ella at fólk hava niðursetta hoyrn (Socialforskningsinstituttet, 2003).

Fólk, ið eru deyv, nýta teknmál sum fyrsta mál og sum samskiftismiðil. Tey eru deyv við føðing ella tíðliga í barndóminum og hava tí ikki ment talumálið. Teknmál, sum síðan 2017 hevur verið viðurkent sum alment føroyskt mál, er serstakt og hevur egna málløru og mentan. Hjá deyvum er neyðugt at duga teknmál fyri at kunna samskifta við onnur. Umframt at vera ein samskiftismiðil er teknmálið samleikaskapandi og ein mentanarberi. (Deyvafelag Føroya, 2020) (Hansen E. P., 2014).

Ein, ið brádliga missir hoyrnina av sjúku ella vanlukku, kann eisini gerast deyvur, men verður kallaður deyvblivin. Viðkomandi er uppvaksin sum hoyrandi og varðveitir sína mentan og samleika sum hoyrandi (Socialforskningsinstituttet, 2003).

Menningin á hoyriøkinum verður støðugt betri. Framkomin hoyritól, og serliga Cochlear Implant, gevur teimum, ið brádliga missa hoyrnina, møguleika fyri aftur at samskifta við hoyrn og talu. Í dag fáa nærum øll børn, ið eru fødd deyv, Cochlear Implant. Tó er ágóðin av hoyritólum og CI missjavnur, og ikki øll uppliva, at hoyritrupulleikarnir eru burtur (Lena Bech Larsen, 2014).

---

[1] Ljóð sum súsan, ýl brúsan o.a. í innara oyranum og/ella í høvdinum, og sum kemur ljóðið uttaneftir (sundhed.dk

[2] Ein sjúka, sum ber í sær reglulig herðindi av sjóðan í oyrunum, ørilsi og niðursett hoyrn (sundhed.dk)

## 4.3 LÍKA SUM OG YMISK

Tað sæst ikki á fólki, at tey hava niðursetta hoyrn, tey tosa vanliga, hoyra, tosa saman og ofta uttan trupulleikar. Í støðum har tey venda bakið til, eru saman við fleiri, ella tað larmar í bakgrundini, kann hoyrnin harafturímóti verða skerd, og tey hoyra ikki alt, ið sagt verður. T.v.s., at viðhvørt eru tey sum tey hoyrandi, og viðhvørt eru tey sum tey deyvu.

Fólk, ið hava niðursetta hoyrn, eru tí javnan í sovorðnari støðu, at tey mugu greiða frá sínum ymisleika og/ella líkleika. Hesi hava til- ella ótilvitaðan tørv á at tryggja sína sjálvsfatan, tá ið tey verða hótt í sambandi við samleika og virði. Tað kann gerast við ymsari fatan, sum bretski sálarfrøðingurin Clynis Breakwell lýsir soleiðis:

**Samtykkisfatan:** Tað er ein roynd at fáa virði og virðismeting fyri luttøku, hóast tað gongur út yvir sereyðkenni hjá tí einstaka við at rætta seg eftir meirilutanum.

**Ghettofatan:** Tað er ein roynd at tryggja sereyðkenni og fáa virði saman við øðrum við somu avbjóðingum í einum sjálvsjáttandi felagsskapi.

**Konfrontatiónsfatan:** Tað er ein roynd at varðveita sereyðkenni við at halda fast í egnum avbjóðingum, møguliga við mótstøðu, og við at vísa til øvutar myndir mótvegis meirilutanum.

**Uppgávulyndi:** Tað er ikki strategi ella ætlan. Talan er um, at fólk hava givið upp ella lata standa til (Stine Weiersøe Villadsen, 2013, s. 8).

# Frágreiðing um tey ymsu tólini

### Hoyritól

Eitt hoyritól er eitt hjálpartól við mikrofon og hátalara, ið situr í ella aftanfyri oyrað. Mikrofonin fangar ljóð, ið verða styrkt og send inn ígjøgnum hátalaran og inn í oyrað (Høreforeningen, 2020).

### BaHa

BaHa er stytting fyri „Bone anchored Hearing aid", og er eitt hoyritól, ið verður fest á eina skrúvu, sum er fest í skallabeinið aftanfyri oyrað. Gjøgnum skrúvuna verða ljóð send út í skallan. Sveiggini fara ígjøgnum skallabeinið, uttan um millumoyrað og inn í innara oyrað, tí tað innara oyrað er samantvinnað við skallabeinið (Ibid).

### CI

CI er stytting fyri Cochlear Implant og er eitt framkomið hoyritól, ið gevur fólki, sum eru deyv ella hava nógv niðursetta hoyrn møguleika fyri at hoyra. Tólið hevur ein innara og ein uttara part. Tann uttari parturin hevur eina mikrofon, ein taluprosessara og ein sendara, og innari parturin hevur ein móttakara, sum liggur undir húðini aftanfyri oyrað og eini elektrodu, ið er løgd inn í oyrasnigilin (Ibid).

## 4.4 HOYRITÓL OG VEITARAR

Í Føroyum eru tveir veitarar av vanligum hoyritólum. Tað er almenna Hoyriklinikkin á Landssjúkrahúsinum og Hoyrnin, sum er privat fyritøka. Haraftrat fáast tvey serlig tól, BaHa og CI, ið fáast í sambandi við skurðviðgerð á sjúkrahúsi. Her er ein stutt frágreiðing um tey ymsu tólini.

Tveir persónar, ið hava nærum eins hoyrikurvu á audiogramminum[9], kunnu hava ymiskar upplivingar í gerandisdegnum. Tá snýr seg partvís um fatanina hjá tí einstaka og um tey krøv, viðkomandi dagliga hevur til hoyrnina, arbeiðsumstøður og líknandi. Um ein arbeiðir í móttøku og skal samskifta við fleiri fólk í gerandisdegnum, ella um viðkomandi er í einum friðarligum umhvørvi uttan nógv samskifti við onnur (Helgadóttir, 2020).

Ágóðin av hoyritóli kann somuleiðis ávirka. Ein, ið hevur nógv niðursetta hoyrn, men stórt gagn av hoyritøknini, kann vera fyri smáum forðingum í gerandisdegnum, meðan annar, ið hevur minni niðursetta hoyrn, men millum lítið og einki gagn av hoyritøknini, upplivir nógvar forðingar og heldur seg hava eitt stórt hoyribrek (Oticon, 2020)

## 4.5 KUNNGERÐ UM STUÐUL TIL HOYRITÓL

Hoyriklinikkin og Hoyrnin arbeiða eftir somu kunngerð Kunngerð um stuðul til hoyritól, sum seinast broytt við kunngerð nr. 218 frá 28. desember 2020. Kunngerðin er fylgiskjal nr. 4. Brot úr kunngerðin verður sett inn her sum vanligur tekstur.

Stuðul til hoyritól verður latin persónum, ið hava varandi niðursetta hoyrn og eru vístir til hoyritólsviðgerð av serlækna í oyra-, nøs- og hálssjúkum.

Hoyriklinikkin veitir brúkaranum bíligasta nøktandi hoyritólið og tekur avgerð um, hvat best hóskandi og bíligasta hoyritólið er. Umsøkjarin rindar sjálvur kostnaðin, tó í mesta lagi 2.000 kr. fyri hvørt hoyritólið. Umsøkjari, 18 ár ella eldri, ið ger av at nýta góðkendan privatan veitara av hoyritólum, kann í staðin søkja um stuðul frá Hoyriklinikkini á Landssjúkrahúsinum til at keypa hoyritól. Stuðulin er í mesta lagi 4.000 kr. fyri hvørt hoyritólið.

Hoyriklinikkin á Landssjúkrahúsinum hevur skyldu til at gera skrá yvir hvønn einstakan brúkara og at skráseta, tá ið nýtt hoyritól ella stuðul til slíkt verður veittur brúkaranum. Stuðul kann ikki verða veittur oftari enn fjórðahvørt ár, uttan so at hoyrnin, eftir eini læknaligari meting, er týðiliga versnað, um hoyritólið ikki longur kann nýtast vegna slit ella likamligar broytingar, um hoyritólið er mist vegna stuldur, eldsbruna ella líknandi, og trygging eigarans ikki tekur við, ella um brúkarin er undir 18 ár, tá ið umsóknin verður latin inn.

Privatur veitari av hoyritólum skal kunna brúkaran um, at treytin fyri at fáa stuðul er, at brúkarin er vístur til viðgerð við hoyritóli av serlækna í oyra-, nøs- og hálssjúkum og privatur veitari av hoyritólum skal í viðgerð tryggja, at brúkarin hevur fingið stuðul játtaðan frá Landssjúkrahúsinum (Ibid).

## 4.6 KRØV, IÐ ERU SETT PRIVATA VEITARANUM AV HOYRITÓLUM

Undir nevndu kunngerð, standa krøv, ið verða sett privata veitaranum.

FORCE[10] hevur árligt eftirlit og gevur loyvið, ið er treyt fyri at veita hoyritól. Talan er um átta útgreinað punkt. Millum annað at audiologiassistenturin, ið sjálvstøðugt tekur hoyriroynd og stillar hoyritól, skal hava minst tvey ára starvsroyndir frá audiologiskari klinikk, ið gera stillingar hjá minst 1.000 kundum árliga. Úrslitið av hoyritólsviðgerðini skal skjalprógvast við mátingum og sjúklingasamrøðum og skal í journal hjá viðkomandi. Eins og privati veitarin skal gera eina virksemisfrágreiðing um tal av stillingum og útlutan av hoyritólum, til- og frágongd av starvsfólkum, viðkomandi eftirútbúgvingar og møguligar klagur (Almannamálaráðið, 2008).

---

3 Eitt audiogram, er ein krossskipan, ið vísir hvussu hoyrnin er og verður nýtt av audiologiassistentum.

4 FORCE Teknisk-Audiologisk Laboratorium er menningar- og royndardepil, ið veitir óhefta ráðgeving, veitir loyvir (certificering), og hevur sín uppruna í Dansk Høreomsorg (Force Technology, 2021).

Hesi krøv verða ikki sett almenna veitaranum í Føroyum.

## 4.7 ÚTFLÝGGJAN AV HOYRITÓLUM Í 2018

Hóast eingi tøk hagtøl vísa, hvussu nógv hava niðursett hoyrn, eru deyv og so framvegis, hevur Hoyriklinikkin á Landssjúkrahúsinum upplýst, at í 2018 vóru umleið 500 hoyritól útflýggjað á Hoyriklinikkini á Landsjúkrahúsinum og umleið 1.000 hoyritól frá Hoyrnini (Hoyriklinikkin, 2020).

Tað er, at umleið 1.500 hoyritól vóru útflýggjað í 2018. Ikki er greitt, um talan er um endurútflýggjan, t.v.s. fólk, sum fyrr hava nýtt hoyritól, og tey skulu endurnýggjast, ella um „nýggj fólk" eru í skipanini. Ávíst er ikki, um fólk hava fingið eitt ella tvey tól.

Víðari verður upplýst, at umleið 20 børn, fødd í tíðarskeiðnum 2002-2017 hava fingið hoyritól. 27 fólk, harav 8 børn, fødd í tíðarskeiðnum 2002-2019, ið hava CI, og 16 fólk, harav 5 børn fødd í tíðarskeiðnum millum 2008-2016, ið hava BaHa (Ibid).

## 4.8 ENDI AV FYRRA PARTI AV VERKÆTLANINI

Vónandi hevur tú sum lesari fingið ávíst innlit í hoyriøki, tó at tað inntil nú hevur verið merkt av nógvari kunning, t.v.s. áhugafeløg, ið virka á økinum, flokkingar av fólki, lógir, tøl og upplýsingar.

Nú fara vit at geva teimum gætur, ið dagliga liva við niðursettari hoyrn, teimum, ið ganga í skúla, eru virkin í arbeiði, og teimum, ið kunnu njóta tíðina eftir at vera farin av arbeiðsmarknaðinum. Hóast bólkurin er fjøltáttaður, er endamálið at finna tað vanliga í ítøkiligu frágreiðingunum frá heimildarfólkunum, og sum kann nýtast til at kunna almenningin um teirra lívsumstøður og avbjóðingar.

„Hóast eingi tøk hagtøl vísa, hvussu nógv hava niðursett hoyrn, eru deyv og so framvegis, hevur Hoyriklinikkin á Landssjúkrahúsinum upplýst, at í 2018 vóru umleið 500 hoyritól útflýggjað ...“

# 5.0

# Heimildarfólkini í verkætlanini

Ellivu heimildarfólk vóru við í verkætlanini. Tey vóru millum 9 og 91 ár, fýra menn og seks kvinnur, harav tvey høvdu CI. Samrøðurnar fóru fram í tíðarskeiðnum oktober-november 2020. Ætlanin var at hava trý heimildarfólk at umboða hvønn aldursbólk, men av serligum umstøðum varð talið hækkað upp í fýra í aldursbólkinum 18-67 ár.

Tey ungu ganga í fólkaskúlanum, ein í barnaskúla og tvey í framhaldsdeild. Í aldursbólkinum 18-67 ár er ein undir útbúgving, tvey í føstum starvi, og ein givin eftir fleiri ár í sama starvi og nærkaðist pensjónsaldri. Ein hevur niðurskurð í arbeiðstíð orsakað av hoyrnini. Í elsta bólkinum eru tey givin fyri aldur. Her vísti tað seg, at øll høvdu fingið trupulleikar við hoyrnini seint í lívinum.

Í aldursbólkinum 18-67 ár hevði ein fingið niðursetta hoyrn í sambandi við sjúku, og seks heimildarfólk høvdu ella fingið tilmælt hoyritól í aldrinum 5 til 9-10 ár. Niðanfyri sæst í raðfylgju frá yngst til elst, nær heimildarfólkini fingu hoyritól, og hvat heimildarfólkini hava sagt um atvoldina til ta niðursettu hoyrnina.

| | |
|---|---|
| Fekk hoyritól, tá ið eg var 5 ár | Bleiv tunghoyrd/ur av sjúku, tá ið eg var 18 mðr |
| Fekk hoyritól, tá ið eg var 6 ár | Niðursett hoyrn mett sum viðfødd |
| Fekk hoyritól, tá ið eg var 7 ár | Hoyrdi eisini illa í barnagarðinum, møguliga viðføtt |
| Fekk hoyritól, tá ið eg var 7-8 ár | Niðursett hoyrn mett sum viðfødd |
| Fekk hoyritól, tá ið eg var 9-10 ár | Tunghoyrd/ur orsakað av sjúku, tá ið eg var 5-6 ár |
| Viðmælt hoyritól, tá ið eg var 6, fekk hoyritól tá, ið eg var 13 ár | Niðursett hoyrn er arvalig í familjuni |
| Fekk hoyritól, tá ið eg var 55 ár | Altíð arbeitt í larmi |
| Fekk hoyritól, tá ið eg var 60 ár | Niðursett hoyrn er í familjuni |
| Fekk hoyritól, tá ið eg var 70 ár | Byrjaði um pensjónsaldur |

Sum tað sæst, vóru heimildarfólkini, ið fingu hoyritól sum børn, millum 5 ár og 9-10 ár, tá ið tey fingu hoyritól, og tað kann verða hildið at vera lutfalsliga seint.

Í 2007 var í danskari verkætlan funnist at tí seinu løtuni, at niðursetta hoyrnin varð avdúkað fyri donskum børnum, og tey vóru tá millum 4 og 6 ára gomul (Videnscenter for hørehandicap, 2007)

Tað er umráðandi, at niðursetta hoyrnin verður staðfest so tíðliga sum til ber, so at foreldur og starvsfólk fáa lagað umhvørvið til rundan um barnið, og soleiðis tryggja best møgulig hoyri-viðurskifti.

Á síðuni hjá oyra-, nøs- og hálsdeildini stendur í sambandi við hoyrikanning av pinkubørnum: Verður hoyrimissurin staðfestur tíðliga, eru góð útlit fyri at bøta um hetta við millum annað hoyritóli og stimbran av hoyrisentrinum í heilanum. Jú fyrr hoyrisentrið verður stimbrað, jú betri møguleikar hevur eitt barn við niður-settari hoyrn at hoyra og málsliga búnast (Oyrna-nasa-hálsdeild, 2021).

Í tí donsku verkætlanini varð mett, at tann seina løtan kundi hava avleiðingar fyri teir sosialu og málsligu førleikarnar, og innlæringin kundi somuleiðis vera ávirkað (Videnscenter for høre-handicap, 2007).

Grundin til at niðursetta hoyrnin ikki varð stað-fest fyrr, varð hildið at vera tí, at námsfrøðingar og heilsusystrar hava avmarkaða vitan um niður-setta hoyrn, og hvussu niðursett hoyrn kann staðfestast. Síðan drálaðu kommunulæknarnir við at senda ávísing víðari til oyra-, nøs- og hálslæknan, ið somuleiðis drálaði við at senda barnið víðari til audiologiassistentin, ið kann taka avgerð um, at barnið kann hava ágóðan av hoyri-tóli (Ibid).

Hetta er sambært oyra-, nøs- og hálslæknanum á Landssjúkrahúsinum sama mannagongd, sum er nýtt í Føroyum (Ellefsen, 2020).

# 6.0
# Lívsumstøðum

Tá samrøðurnar vóru lidnar, og alt var ljóðskrivað, varð farið undir greiningararbeiðið við tí endamáli at vita, hvussu fólk. ið hava niðursetta hoyrn, greiða frá sínum lívsumstøðum, og hvørjar avbjóðingar tey uppliva dagliga.

Ljóðskrivaða tilfarið varð eftir fyribrigdarfrøðiligari mannagongd lisið í gjøgnum fleiri ferðir, fyrst hjá tí einstaka, síðan í aldursbólkunum hvør sær og sum samlað heild. Soleiðis varð leitað eftir fyribrigdum, ið høvdu serligan týdning fyri lívsumstøðurnar hjá heimildarfólkunum ella á annan hátt svaraðu upp á verkætlanarspurningin.

Byrjað verður við fyribrigdum, ið vístu seg hjá teimum ymisku aldursbólkunum.

Hjá teimum undir 18 ár vóru trý viðurskifti, ið høvdu serligan týdning. Tað vóru hoyriviðurskiftini í skúlunum, avbjóðingar í sambandi við spæl og samspæl og samspæl við lærararnar.

Í aldurbólkinum 18-67 ár verða tvey fyribrigdi viðgjørd. Tað er langtíðar ávirkanin, sum niðursetta hoyrnin hevur haft á lívsgóðskuna og nýtslan av ymiskum teknikki í gerandisdegnum.

Í aldursbólkinum yvir 67 ár vórðu trý viðurskifti viðgjørd. Tað var broyttur samskiftisháttur, broytt sjálvsfatan og sosialt afturhald.

Í samrøðunum vóru ymsir spurningar, ið snúðu seg um ábyrgd og atkomu, og í greiningararbeiðinum vístu svarini áhugavert samanfall. Tað vóru spurningarnir um heimildarfólk halda seg fáa alt av týdningi við í gerandisdegnum, hvørs ábyrgd tey halda tað er, og um tey nýta serliga mannagongd, ið tryggjar, at tey fáa alt við. Hesi fyribrigdi vóru óheft av aldursbólkum og verða greinað til seinast. Viðurskiftini verða viðgjørd í somu raðfylgju, sum tey eru skipað í her.

## 6.1 TEY UNGU UNDIR 18 ÁR SIGA FRÁ SÍNUM LÍVSUMSTØÐUM

### 6.1.1 Hoyriviðurskiftini í skúlanum

Tað er nógvur larmur í skúlastovunum, har heimildarfólkini ganga. Tey nevna borð og stólar, ið skrambla, smáprát, skav og klikkljóð.

Tey lýsa ófriðin, og hvussu hann ávirkar tey: So fær mann ikki alt við, tí hini larma, og mangan tími eg ikki inn í skúlastovuna, tí har er ofta so nógvur larmur (1, 2020). Tað er eisini irriterandi í skúlanum, serliga um onkur ger óljóð (2, 2020). Um tað er ov nógvur gangur, so kann tað vera frustrerandi. Eg fái ikki arbeitt har, sum ov nógvur gangur er (3, 2020).

Næmingarnir sita fremst í skúlastovunum, tó at ein situr úti við síðuna: Eg siti fremst, men longst móti hurðini, so eg siti líka sum (ger tekin til miðjuna). Um tað vóru bestu umstøður, so hevði eg nokk skula siti í miðjuni, tí so hevði eg kunna sæð læraran (3, 2020).

Ein harmaðist um, at eingin tekstur var á, tá ið tey síggja film í skúlanum; Tað er ordiliga keðiligt, at eingin tekstur er á. Tá siga hini (floksfelagar): øøh, nei, ikki koyra tekst á, tað forstýrar og sórit (2, 2020).

Í einum av teimum trimum skúlunum vóru tey tilvitað um avbjóðingarnar av niðursettu hoyrnina og nýttu ljóðfyribyrging í skúlastovuni. Har vóru plastplátur lagdar á øll borðini fyri at dempa ljóðið og forða fyri, at tað kann breiða seg og hanga í rúminum. Lærarin, ið antin nýtti floytu ella rópti hart, stóð altíð nær við næmingin, ið hevur niðursetta hoyrn, tá ið boð vóru givin um, at næmingarnir skuldu upp úr hylinum eftir svimjing.

**Viðmerking**

Fyri at lýsa týdningin í frásøgnini hjá heimildarfólkinum er her eitt dømi, sum vísir, hvat kann henda, tá ið lærarin ikki er tilvitaður. Tað er ein løta síðan, at næmingarnir eru komnir í svimjihylin. Lærarin gongur rundan um hylin og syrgir fyri trygdini. Næmingurin, ið hevur niðursetta hoyrn, eygleiðir læraran við jøvnum millumbili. Við eitt rópar lærarin, at nú skulu næmingarnir upp. Næmingarnir skunda sær, vilja vera fyrst. Næmingurin, ið hevur niðursetta hoyrn, kann í hesum samanhanginum haldast at vera deyvur, tí hoyritólini liggja í skápinum. Vitjandi svimur framvegis, men merkir tær broyttu rørslurnar og atburðin í hylinum, hyggur rundan um seg og roknar skjótt út, at lærarin hevur sagt, at tey skulu upp. Talan er um sekund,

men næmingurin við niðursettari hoyrn fær ikki møguleikan fyri at vera millum tey fyrstu.

Í frásøgnini segði heimildarfólki, at lærarin stóð altíð nær við. T.v.s., at næmingurin kann hugsavna seg um svimjingina og samveruna við floksfelagar sínar heldur enn at eygleiða læraran og ivast í, nær rópt verður, at teir skulu upp.

Tá ið skúlatímin er liðugur, er fríkorter, men avbjóðingarnar hjá heimildarfólkunum er ikki av enn.

### 6.1.2 Spæl og samspæl

Spæl og samspæl vísti seg vera ein avbjóðing hjá teimum trimum heimildarfólkunum. Ein umrøddi spælið krógva og blunda og sigur: So hoyri eg ikki hini. eg hoyri ikki, um tey koma ella soleiðis, So plagi eg at skrúva tey eitt sindur meiri upp, so fari eg handavegin, so hoyri eg okkurt. So finni eg kanska onkran (1, 2020).

Avbjóðingin var týðiligast í eini frágreiðing um kortspæl: Tá vit spæla okkurt spæl, og onkur sigur onkrar reglur, og so spæli eg, og eg havi ikki fingið reglurnar við. So geri eg okkurt, sum ikki er lov, og so ordiliga „hatta er ikki lov" og eg ordiliga, „tað visti eg ikki av". „Men eg segði tað beint í áðni, men eg fekk tað ikki við". Tað er nakað, eg ofta komi út fyri (3, 2020).

**Viðmerking**

Spæl og samspæl eru týðandi partar av lívinum, bæði hjá børnum, vaksnum og eldri. Partarnir ávirka hvønnannan við skiftivís at fylgja og geva boð, tosa egna søk, seta mørk og virðismeta mørkini hjá øðrum, vera ósamd, loysa ósemjur og í ávísum førum góðtaka viðurskifti fyri at varðveita sítt pláss í spælinum. Tað vil siga, at partarnir læra at stilla seg í mun til hvønnannan. Luttakarar læra seg at týða bæði formligar og óformligar reglur. (Danmarks Læringsportal, 2021).

Í spælinum krógva og blunda eru tað sansirnir, ið eru virknir, at lurta, hyggja og merkja á sær, um nakar er tætt við. Orsakað av niðursettu hoyrnini hevur heimildarfólki ójavnar treytir, bæði í sambandi við at krógva og blunda. At viðkomandi kortini ger av at vera við, kann vera, tí samspælið við floksfelagarnar er meiri umráðandi enn tað at vera best í spælinum.

Í frágreiðingini um kortspælið nýtti heimildarfólki greiðar keipur, rørslur og rødd, ið vóru við til at lýsa samspælið og gera avbjóðingarnar uppaftur greiðari. Meðan viðkomandi greiðir frá, varð víst við kroppinum teir báðar persónarnar, sum koma uppí, og tað er onkur og eg. Tá ið viðkomandi tosar fyri onkur, verður røddin ómild, og andlitsbragdið vísir eina blanding millum vreiði og andstygd[7] . Tá ið tosa verður fyri eg verður røddin bivandi, kropsburðurin kúgaður, og andlitsbragdið vísir ørkymlan.

Fyri at skilja hvat tað er, ið fer fram millum partarnir, er neyðugt at vita nakað um heilt smáar samráðingar, sum eru í einum splittsekundi og á mikrostigi. Tað onkur og eg uppliva kann samanberast við ein persón, ið er um at trína út fyri ein bil. Partarnir fáa eygnasamband, bilførarin verður kløkkur og ætlar at at øsa seg, og persónurin smílist ivandi, og við eygum og kropsburði sigur viðkomandi ups og orsaka, og bilførarin sissast og koyrir víðari.

Tað, ið fer fram, verður kallað interaktión millum partarnar. Ein interaktión verður málfrøðiliga lýst sum eitt samspæl, har týdningurin verður skaptur í sínámillum samráðingum millum luttakararnar (Hansen M.-B. M., 1998).

Tað var Erving Goffman, kanadiskur mikrososiologur (1922-1982) , sum fyrst nýtti hugtakið andlitsarbeiði ella facework (Ibid). Hetta ástøði hava Penelope Brown og Stephen Levinson víðariment.

Sambært teimum hava øll menniskju (eisini onkur og eg) eina ítøkiliga mynd av sær sjálvum, og sum viðkomandi vil vísa fram. Fyri at tann einstaki kann varðveita sína mynd, er ein týðandi partur av interaktión at finna javnvágina, so hvørki sendari ella móttakari eru fyri eyðmýking.

7 Lýsingin av andlitbragdi vísir til myndir í KAT-Kassen, ið er sernámsfrøðiligt amboð í sambandi við kognetiva affektiva terapi.

Tað var tað, ið hendi ímillum partarnar í sambandi við bilin. Smílið og kropsburðurin gjørdu, at partarnir góðtóku samspælið, og hvørgin gjørdi sær fyri skommum.

Í gerandisdegnum nýta vit tvey sosial andlit fyri at varðveita okkara mynd, eitt jaligt og eitt neiligt. Tað jaliga andlitið myndar okkara sjálvsfatan, ynski um viðurkenning, áhuga og virðir og at vera við í einum felagsskapi við øðrum. Tað neiliga andlitið myndar ymisk hóttanarfyribrigdi mótvegis okkara virkisøki. Hóttan við atliti at virkisfrælsi, sjálvræði ella fáa álagt eitthvørt, ið stríðir ímóti okkara fatan. Andlitini verða nýtt til at finna javnvágina og taka broddin av hóttandi andlitum, tað tey kalla face threatening acts (Hansen M.-B. M., 1998).

Tað var júst lýsingin av einum hóttandi andliti, sum heimildarfólkið í kortspælinum greiddi frá, og í tí støðuni megnaðu partarnir ikki at finna javnvágina. Partarnir kláraðu ikki at ganga í takt.

Um børn og ung ofta ella javnan ikki megna spæl ella samspæl við onnur, verður tað ein byrða, sum viðkomandi heldur er omanfyri tann førleika og evni, hann/hon heldur seg hava, og tað kann bera í sær, at tey aftra seg í mun til fara í samspæl.

Eingin av heimildarfólkunum tosaði síðan við nakran um avbjóðingarnar í samspælinum.

### 6.1.3 Lærararnir og ungu heimildarfólkini

Tvey av heimildarfólkunum vóru tannáringar og hildu, at lærararnir vóru í so nógv eftir hoyrnini, og teir vístu ikki flokkinumfyrilit í sambandi við eyðmýkjandi útsagnir.

Tey spyrja altíð, um eg hoyri ella so, men eg tími bara ikki altíð at lurta eftir (2, 2020). Einaferð kom ein lærari yvir, sló í borðið og segði: „Sig frá, um tú einki fært við við," og „Eg havi upplivað at forsova meg, og so hevur lærarin sagt, tendra vekjaran, ha? og tað var frammanfyri øllum (3, 2020).

Eitt heimildarfólk segði, at tað kundi vera torført at fáa alt við í skúlanum, og serliga um lærarin gav boð um eitthvørt, beint sum tímin var liðugur, og tað var nógvur ófriður í flokkinum. Lærarin sigur, í morgin skulu tit ikki í skúla, og so møti eg upp allíkavæl, tí tað hevði eg ikki fingið við. Tað er hent sooo ofta. (4, Samrøða, 2020).

Ein hevði ikki fingið við, at brandvenjing var í skúlanum og eg bleiv ordiliga kløkkur og fekk ræðuliga ilt í oyruni. Tá var ordiliga nógvur larmur. Tá hevði eg ikki fingið nakað at vita frá lærarunum. (1, 2020).

**Viðmerking**

Ein næmingur, ið hevur niðursetta hoyrn, má altíð kunna líta á, at viðkomandi fær neyðug boð. Um næmingurin ikki veit um og nær neyðug boð verða givin, má viðkomandi sjálvur fylgja við. Viðkomandi má støðugt verða á varðhaldi við atliti at øllum ljóði og óljóði, bæði tey, ein hoyrir, og tað, ein sær. Viðkomandi má javnt og samt taka støðu til, um hetta eru boð, ið verða givin, ella støður, ið ongan týdning hava. T.v.s., at næmingurin er í støðugari tilbúgving.

Hetta tekur orku frá sjálvari undirvísingini, órógvar hugsavningina, og onnur kunnu fata næmingin sum óróligan og við tvørrandi evnum at hugsavna seg.

## 6.2 UMSTØÐURNAR HJÁ UNGUM UNDIR 18 ÁR

Sambært heimildarfólkunum hava næmingar, ið hava niðursetta hoyrn, vánaligar hoyri- og læruumstøður í fólkaskúlanum 2020. Tann nógvi larmurin og vantandi tekstur í undirvísingarhøpi hava við sær ójavna atgongd til undirvísingartilfar.

Spæl og samspæl vóru avbjóðandi fyri tey ungu heimildarfólkini. Tey høvdu ójavnar fortreytir fyri at koma upp í samspælið, ilt við at hoyra, tá ið onnur ung greiddu frá spælireglum, og ein svaraði bara okkurt, tá ið viðkomandi ikki hoyrdi spurningarnar hjá øðrum. Avbjóðingarnar í spølum eru viðurskifti, sum foreldur og fakfólk eiga at vera tilvitað um og hjálpa barninum at finna loysnir og svar, har bæði tey og viðspælararnir fáa varðveitt sín integritet.

Bara í einum av trimum skúlum verður arbeitt tilvitað við at bøta um hoyriviðurskiftini og

ljóðfyribyrging At næmingar sita úti við síðuveggin bendir á vantandi innlit í tørvin á at síggja tann, ið tosar og fyri munnavlesing, ið kann bøta um hoyriviðurskiftini.

Frágreiðingarnar um næmingar, ið møta upp, tá ið teir hava frí ella ikki hava fingið fráboðan um brandvenjing, vísir á týdningin av greiðari mannagong, tá ið boð skulu gevast í skúlunum.

## 6.3 FÓLK MILLUM 18-67 ÁR SIGA FRÁ SÍNUM LÍVSUMSTØÐUM

Greiningararbeiði í hesum aldursbólkinum var umfatandi. Heimildarfólkini høvdu nógv upp á hjarta, og frágreiðingarnar fevndu um eitt langt tíðarskeið.

### 6.3.1 Niðursett hoyrn

Tvey heimildarfólk tosaðu um tíðarskeiðið, har viðkomandi fekk staðfest niðursetta hoyrn. Fyrra heimildarfólkið sigur seg hava verið 18 mánaðir, tá ið viðkomandi gjørdist tunghoyrd/ur av sjúku, og tað funnu tey ikki útav, fyrr enn eg var fimm ár, sigur viðkomandi, ið sigur tað hevur ávirkað hann/hana sera nógv. Eg fekk tunglyndi, tá ið eg var eini 11 ár, og eg visti ikki hví. Tað einasta, eg visti, var, at eg var ordiliga kedd/ur og hevði tað ikki gott (4, Samrøða, 2020).

Seinna heimildarfólkið sigur: Eg havi verið um 7-8 ár, tá ið tey funnu útav, at eg var deyv/ur. Og so fekk mann eitt hoyritól slongt upp á oyrað, og so var tað út, og so finnur tú út av tí sjálvur. Víðari sæst, at floksfelagarnir flentu og spurdu, hvat hatta var og meintu við hoyritólini. Lærararnir høvdu dagliga viðmerkingar so sum, harragud, tit eru strævin altso, pínadoyð, lurtar tú heldur ikki nú? og hví skal mann altíð siga tað tvær ferðir við teg? (5, 2020).

Trý heimildarfólk søgdu, at tey vóru ógvuliga troytt út á seinnapartin. Eitt heimildarfólk greiðir soleiðis frá: Viss eg havi verið í gongd ein heilan dag, so er eg heilt ótrúliga móð/ur. Orki slett einki, tað er akksum, at høvdið er fult. So fordufti eg bara, taki hoyritólini úr og fari inn í kamarið, hurðina aftur og leggi meg á songina at sortera alt tað, sum er í høvdinum, til at fáa frið í høvdinum. (...) eg klári ikki at fara í fleiri føðingardagar í somu viku. So blívi eg for móð/ur í høvdinum, og so ávirkar tað mín arbeiðsdag dagin eftir. So hoyri eg nógv verri, tá eg fari til arbeiðis. So velji eg heldur tað, tí tað er mítt livibreyð. So eg droppi nógv sosialt fyri at fara til arbeiðis (5, 2020).

### 6.3.2 At hava niðursetta hoyrn í almennum høpi

Trý av heimildarfólkunum funnust at hoyriviðurskiftum í almennum høpi: Har nógv fólk eru, verður ikki ein gong snakkað í mikrofon. Tað er akkurát sum ein sjálvfylgja at øll hoyra (5, 2020).

Líknandi viðmerking var frá øðrum heimildarfólki, har skúlin boðaði til felags foreldrafund og byrja við spurninginum: Eg behøvist ikki at snakka í mikrofon, ha? Eisini til fyrilestrar við nógvum fólkum, mann ikki kennir. So siga tey „hoyra tit meg?" Tú fært ikki ein av hesum at siga, „nei, eg hoyri teg ikki" ella „jú brúka mikrofonina", tí so følir mann, at mann irriterar læraran. Tað átti at verið krav um at brúka mikrofon í øllum skúlum, og at allir skúlar áttu at haft útgerðina (6, 2020).

Um eg skal til fyrilestur ella líknandi, so eg má hava tekst, annars fái eg einki við, men tað er grúiliga sjáldsamt Eg kann til dømis ikki fara til sjónleik og rokna við at fáa nakað burturúr. So tað tímir mann minni og minni (7, 2020).

#### Viðmerking

Her síggjast ymiskar avleiðingar, ið standast av niðursettu hoyrnini. Hvussu ógvisligar persónslýsingarnar frá lærarunum vóru, og tað, at viðkomandi minnist fleiri av setningunum, merkir, at tey hava haft týdning fyri viðkomandi.

Frásagnirnar um tungt sinnalag, tunglyndi, vantandi orku og frával av sosialum tiltøkum eru beinleiðis í samsvari við niðurstøðurnar í donsku verkætlanina, sum varð nevnd í innganginum (Socialforskningsinstituttet, 2003).

### 6.3.2 At brúka teknikk

Í hesum aldursbólkinum varð nógv nýtt av teknikki; ella taktikkur, sum mann við tíðini lærir seg (6, 2020).

Tað er, sum um fólk halda, at mann er eitt sindur býttur, tí at mann ikki hoyrir alt. Tá mann bleiv eitt sindur eldri, dugdi mann betur at krógva tað upp á ein ella annan máta, at mann ikki hoyrdi. Viss mann sat í einum bólki, har mann ikki hoyrdi, og mann visti, at tey fóru at spyrja meg ella soleiðis, so skundaði eg mær bara at reisa meg upp, fór á vesið ella okkurt sovorðið (5, 2020).

Meðan viðkomandi greiðir frá síni nýtslu av teknikki, hoyrist á røddini, at viðkomandi drálar, hugsar og metir um støðuna: Mann vurderar ... er hetta ein viktig samrøða ... ein viktigur spurningur, (hugsar) sleppi eg við at siga hmm, ella hyggja tey upp á meg, og vænta tey eitt svar. Tí so má mann siga, at hatta fekk eg ikki fatur á. Tað er tað sama í telefonini. Tú fangar tað ikki, (pausa, sum um viðkomandi lurtar) og tú fangar tað ikki. So sigur tú, at sambandið er vánaligt í staðin fyri at biðja fólk siga tað umaftur (6, 2020).

Eftirhondini so lukkar mann bara av. Tað hevur mann lært seg. Mann letur bara vera við at hyggja inn í eyguni á fólki, tí annars so halda tey, at tú ert við í samrøðuni, ella fara at siga okkurt við teg. Tá er tað ordiliga soleiðis „eg eri ikki við her ..." (Ibid)

Orsakað av tí nógva teknikkinum í hesum aldursbólkinum varð farið at leita eftir teimum í hinum aldursbólkunum, hóast tað ikki vísti sær hava serligan týdning í fyrsta umfari.

Tað áhugaverda var, at í aldursbólkinum yvir 67 ár varð eingin teknikkur umrøddur. Her tykjast tey at vera meiri beinleiðis: ofta komi eg at siga við fólk, „vent tær hendavegin, tá tú tosar við meg, tí tað nýttar einki at venda reyv og tosa við meg" (9, 2020), ella „so má eg bara spyrja umaftur" (10, 2020).

Í aldursbólkinum undir 18 ár vórðu ávísir teknikkir umrøddir. Tað var í ítróttarsamanhangi. Har hugdu tey at hinum og funnu útav, hvat tey skuldu gera. Tvær støður vóru lýstar soleiðis: Tá fólk tosa spakuliga, so koyri eg onkuntíð eygnabrýrnar upp soleiðis, so sær mann, at eg ikki hoyri (1, 2020). Og lærarin sigur okkurt, men eg hoyri hann ikki, so vísi eg, at eg ikki hoyri, og so sigur hann tað umaftur (F, 2020). Og til seinast: So kemur beiggi hennara inn og sigur okkurt. So sigi eg bara ja ella nei, sjálvt um eg einki hoyrdi (2, 2020).

**Viðmerking**

Teknikkur kann vera góður at menna, eitt nú at sjónin kann viga upp ímóti tí niðursettu hoyrnini, umframt smáar tilsipingar, sum vísa, at ein hevur ikki hoyrt tað, ið varð sagt. Ymiskur teknikkur er somuleiðis ein partur av samskiftismentanini hjá fólki, ið hava niðursetta hoyrn.

Tó tykist teknikkur, sum heimildarfólkini nýttu, at ganga út yvir tann einstaka. Tey snúgva sær undan at verða spurd, vilja ikki verða hoyrd í bólkaarbeiði og skylda upp á vánaliga sambandið heldur enn at viðganga, at tey ikki hoyrdu tað, ið varð sagt.

Í lýsingini av spæli og samspæli skuldu partarnir stilla seg í mun til hvønn annan, kjakast, tingast og semjast o.s.fr. Tað tykist, sum heimildarfólkini bera seg undan samspælinum tí so følir mann, at mann irriterar læraran (6, 2020) og heldur velja at nýta teknikk.

Samvera og sosialt samband eru týðandi partur av tí at vera menniskja, men hjá heimildarfólkunum í hesum og undanfarna aldursbólki tykist samveran (við fleiri) at vera ein trupulleiki. Fyri at skilja hví hesin trupulleiki tekur seg upp, er neyðugt at vita, hvat samveran er, og hvat fer fram í eini samveru.

### 6.3.3 Samvera og sosial læring

Étienne Wenger[8] lýsir sosiala sambandið og tað, tey flestu gera gjøgnum dagin soleiðis: Vit eru saman, samskifta, seta okkum til borðs, og hóast vit hava gjørt tað óteljandi ferðir, og sumt av tí, vit siga, vísir til eitthvørt, ið er gjørt og sagt í øðrum samanhangi, so er støðan nýggj. Tað eru nýggj inntrykk og ein nýggj uppliving (Wenger, 2004).

8 (1952-) sveisiskur læruteoretikari, ið arbeiðir við situeraðari læring og praksisfelegsskapi

Í samveruni skapa vit meining, víðka um fatanir, beina á aðra leið, kveistra áskoðanir burtur, tulka, tillaga ella vátta. Stutt sagt, vit endurtulka tær meiningssøgur, vit eru partar av. Lívið er ein støðug samráðingarskipan í sambandi við meining (Ibid).

Luttøka í einum felagsskapi er sostatt bæði persónlig og sosial. Tað er ein fjøltáttað samanrenning av gerningum, samrøðum, hugsan, kenslum og tilknýti. Luttøka umfatar allan persónin, okkara kropp, tilvitsku, kenslur og sosial sambond (Ibid, s. 70). Hetta er gerandisdagurin hjá teimum flestu.

Hjá einum persóni, ið hevur niðursetta hoyrn, kann samveran verða ein avbjóðing. Í samveruni við tvey ella fleiri má viðkomandi støðugt hyggja at tí, sum tosar. Kanska eru hoyriviðurskiftini ikki so góð, og tí má viðkomandi munnavlesa. Brádliga brýtur ein av, hov, hvør tosar nú? Leitar og finnur viðkomandi, skal líka lurta eina løtu, áðrenn viðkomandi er við aftur. Í samveruni, meðan viðkomandi fylgir við og lurtar, skapast meiningar, fatanir víðkast, og tær meiningssøgur, ið vóru, eru nú endurtulkaðar.

Spurnatekin kann setast við, um er viðkomandi partur av hesi meiningsskapan og samráðingum, ella hevur hann/hon ríkiligt at gera bara við at fylgja við í samrøðuni.

Samvera, samspæl og samskifti, sum umfata allan persónin, kropp, tilvitsku, kenslur og sosial sambond, má haldast at vera ein avbjóðing, tí fólk, ið hava niðursetta hoyrn, eru upptikin av at lurta.

## 6.4 UMSTØÐURNAR HJÁ FÓLKI MILLUM 18 OG 67 ÁR

Heimildarfólk í hesum aldursbólkinum hava ring minnir um fyrsta tíðarskeiðið, tá ið niðursetta hoyrnin varð staðfest. Tað var eingin frálæra ella vegleiðing til viðkomandi, ið fekk hoyritól sum barn. Tungt sinnalag og væntandi orka eru framvegis partar av gerandisdegnum.

Nýtslan av tí nógva teknikkinum tykist ganga út yvir tann einstaka og kann verða atvoldin til, at fólk, skipanir og samfelagið sum heild ikki eru vitandi um tørvin á serligum fyriliti við fólki, ið hava niðursetta hoyrn.

Innlit í tær smáu interaktiónirnar og ástøði um sosialu samveruna, kunnu vónandi hjálpa tí einstaka at skilja, at viðkomandi ikki er býttur, men hevur avbjóðingar, ið krevja, at allir partar eru vitandi um tað, sum hendir.

## 6.5 FÓLK YVIR 67 ÁR SIGA FRÁ SÍNUM LÍVSUMSTØÐUM

Sum áður nevnt hava tey trý heimildarfólkini í aldursbólkinum yvir 67 ár fingið niðursetta hoyrn sum vaksin ella seint í lívinum. T.v.s., at tey eru farin frá at hava hoyrt vanligt til nú at hava niðursetta hoyrn.

Frágreiðingarnar snúðu seg tískil um eitt avmarkað tíðarskeið. Viðurskifti, ið høvdu týdning fyri henda aldursbólkin, vóru broyttur samskiftisháttur, broytt sjálvsfatan og sosialt afturhald.

### 6.5.1 Samskifti

Tað vísir seg at vera øgiliga torført at fáa onnur at skilja, at mann hoyrir illa sjálvt hjá teimum, mann livir saman við dagliga, tí ofta komi eg at siga við fólk: „vent tær hendaveg tá tú tosar við meg“. Tí tað nýttar einki at venda reyv og tosa við meg (9, 2020).

Eitt av heimildarfólkunum varð spurt: Um tú ikki fær alt við, sigur tú so, ha? og viðkomandi svarar: Eg hugsi um tað. Um eg havi sagt ha eina ella tvær ferð, so hugsi eg, „eg sigi tað ikki einaferð aftrat“. (So tú roynir at umganga tað?). Ja, tað geri eg. Eg haldi, tey blíva meiri irriterað, viss mann ikki hoyrir, og viss mann sigur, ha, so spyrja tey beinanvegin: „Hvar er hoyriapparatið?“. Tey tíma ikki at siga alt umaftur og umaftur (8, 2020).

Mann mátti bara flenna, tá hini flentu, mann fekk einki ordiliga við, og ein sat har sum eitt býtt. Tað er øgiliga strævið (10, 2020).

### 6.5.2 Niðursett hoyrn

Niðursetta hoyrnin tyktist leiða til broyttan hugburð og sjálvsfatan hjá heimildarfólkunum:

Viss fleiri sita og snakka, so fái eg einki við. Í selskapi eri eg farin at halda meg burtur. Eg

# „... tað er øðiliga keðiligt, tá tú er millum fólk og sita og siga, ha? ha? ha?"

trekki meg tilbakar. Nei, tað er øðiliga keðiligt, tá tú er millum fólk og sita og siga, ha? ha? ha? alla tíðina. Tað er forbannað irriterandi, tá mann hevur humoristiskan sans at sita og gálva, tá ein hevur fýrt eina góða søgu av. Tað er øgiliga irriterandi. Tí eri eg øgiliga sjáldan til nakað longur. Tað hóvar mær ikki longur, nei! (9, 2020).

So sigur onkur, „men, hevur tú ikki hoyriapparat?" Jú, víst havi eg hoyriapparat, men tey hoyra bara her og ikki har yviri (peikar rundan um oyruni og á frástøðu) (Ibid)"

Her sæst, hvussu tær broyttu umstøðurnar og irritatión frá umhvørvinum leiðir til sjálvsábreiðslu: Tey tíma ikki at siga alt umaftur. Tað følist óbehagiligt, tað ger tað, og so eri eg eisini so irriterað inn á meg sjálva, at eg skal hava gloymt hoyriapparatið. So spyrja tey, „hvar er hoyrapparatið?" Tey meina tað ikki illa, men eg føli tað soleiðis (8, 2020).

## 6.6 UMSTØÐURNAR HJÁ FÓLKI YVIR 67 ÁR

Heimildarfólkini yvir 67 ár eru partur av tí triðingi av fólki yvir 60 ár, sum fáa niðursetta hoyrn. T.v.s. teimum, har tað við aldrinum verður torførari at fata talu og at staðfesta hvaðani ljóðið kemur. Beinbygnaðurin í oyranum kálkast, trummhinnan missir sín smidleika og tey smáu hárini, sum leiða ljóðið inn í innara oyrað, vikna við aldrinum. Hetta er vanlig fylgja av at eldast. (Haanes, 2016, s. 4) Tað er ein staðfestin og ein av óhepnu fylgjunum av tí framíhjárætti at gerast eldri.

Tað er tó umráðandi, at heimildarfólk og onnur, ið hava niðursetta hoyrn, ikki halda seg aftur í sosialum høpi. Fólk, ið hava niðursetta hoyrn, eru í samfelagnum og hava javnbjóðis rættindir. Tey skulu vera við, krevja neyðugt umhugsni og taka nýggju samskiftishættirnir til sín.

Seinasta viðmerking í hesum samanhanginum er dagliga nýtslan av hoyritólinum. Sum tað stóð í innganginum, hevur daglig nýtsla av hoyritóli positiva ávirkan á nervalag og kognitivar førleikar hjá eldri fólki (Sharma, 2020) og fyribyrgir demens (Merete Osler, 2018).

Til seinast verða viðurskiftini, ið vóru óheft av aldursbólkum, greinað.

# 7.0
# Ábyrgd og atkoma

Í greiningararbeiðinum vísti hugburðurin til ábyrgd og atkomu seg at hava ein týðandi leiklut. Atkoma merkir í samsvari við rættindi hjá fólki, ið bera brek á síðu 19, at fólk, ið hava niðursetta hoyrn, á jøvnum fóti við onnur, hava møguleika at hoyra og/ella fylgja við í sjónvarpssendingum, tíðindum og upplýsingum, umframt møguleika fyri at vera við í tiltøkum, so sum fyrilestrar, undirvísing, gudstænastur og líknandi.

Í samrøðunum vóru ymiskir spurningar, ið snúðu seg um ábyrgd og atkomu: Fært tú alt við í gerandisdegnum, alt av týdningi? Fært tú alt við í útvarpi og sjónvarpi? Hugsar tú um, hvørt sendingar í sjónvarpi hava tekst ella ikki? Hevur tú nýtt skrivitulk? Hugsar tú um, hvussu tú sjálv/ur kanst bøta um hoyriviðurskifti hjá tær í gerandisdegnum? Eru mannagongdir, ið tryggja, at tú fært alt við, so at tú kanst javnmetast við hoyrandi í arbeiði/skúla? Hvørs ábyrgd heldur tú, tað er, at tú fært alt við? Spurningar og svar liggja sum fylgiskjal nr. 5.

Í greiningararbeiðnum vístu svarini upp á tríggjar spurningar eitt viðkomandi samsvar.

## 7.1 SJÓNARMIÐ, IÐ KUNNU HAVA AVLEIÐINGAR

Átta av teimum tíggju heimildarfólkunum halda seg ikki fáa alt av týdningi við í gerandisdegnum. Eingin teirra nýtti serligar mannagongdir, ið tryggja, at tey fáa alt við í gerandisdegnum. Og svarini upp á, hvør hevur ábyrgdina av, at tú fært alt við, kunnu býtast í tríggjar bólkar. Fimm hildu, at tað var teirra egna ábyrgd at fáa alt við, fýra vóru av ymsum grundum ógreið, og ein helt, at báðir partar høvdu ábyrgd.

At lýsa týdningin av greiðari mannagongd og dømi um, hvat kann henda uttan, vísti útsøgnin, har næmingurin ikki hevði fingið kunningina við: Lærarin sigur, at í morgin skulu tit ikki í skúla, og so møti eg upp allíkavæl, tí tað hevði eg ikki fingið við. Tað er hent sooo ofta (4, Samrøða, 2020).

Upp á sama spurning svaraði ein: Nei, eg eri líka sum hini, eg eri ikki í einum serflokki (2, 2020). Við útsøgnini nemur viðkomandi við ynskið um at vera líka sum og óttan fyri at vera øðrvísi (s.16) og sigur í sama viðfangi frá sær tillaging, ið kann tryggja góða kunning í gerandisdegnum.

## 7.2 GREINING AV ÁBYRGD

Orðið ábyrgd hevur serligan týdning í løgfrøði og í tryggingarhøpi. Talan er ikki um henda formin fyri ábyrgd. Her verður hugsað um, hvør skal syrgja fyri, at tú hoyrir.

Tey fýra, hvørs svar um ábyrgd vóru ógreið, tykjast ikki hava tikið støðu, og vóru í ein ávísan mun knýtt at foreldrum og lærarum. Hesi virka í gerandisdegnum, gera tað, tey verða biðin, gera ikki mótstøðu, seta eingi krøv, hvørki til sín sjálvs ella skipanirnar.

Tey fimm, ið greitt halda, at atkoma er ábyrgd hjá tí einstaka, hava eitt sjónarmiði, sum ber í sær, at kravið um at hoyra verður vent inneftir. At tað er tann einstaki, ið skal kýta seg og royna at lurta betur eftir.

Viðkomandi, ið helt, at báðar partar hava ábyrgd í sambandi við atkomu, settu krøv. Krøv til sín sjálvs til dømis um at nýta hoyritóli og lurta eftir, men eisini til tær ymisku skipanirnar, tað veri seg skúli, fyrilestur, gudstænastu o.s.fr. Viðkomandi kann taka støðu til, hvørs ábyrgd atkoma er. Er tað egin ábyrgd, t.v.s., at viðkomandi eigur at kýta seg fyri at fáa alt við, ella um tað eru skipanirnar, ið hava ábyrgdina av at bøta um hoyriviðurskiftini og harvið tryggja, at viðkomandi hevur møguleika fyri at fáa alt við.

T.v.s., at 9 av 10 heimildarfólkum seta eingi krøv um fyrilit. Tey góðtaka at vera á foreldrafundi, gudstænastu og við sjónvarpið uttan at hoyra ella at kunna lesa ein tekst og halda, at tað er teirra egna ábyrgd at lurta betur eftir.

Hesin hugburður er við til at konstruera veruleikan, og at verandi støða heldur fram.



„Lærarin sigur, at í morgin skulu tit ikki í skúla, og so møti eg upp allíkavæl, tí tað hevði eg ikki fingið við. Tað er hent sooo ofta“



# 8.0

# Svar upp á verkætlanar-spurning

Niðursett hoyrn ávirkar lívsumstøður hjá heimildarfólkum, og tey eru fyri ymsum avbjóðingum í gerandisdegnum. Tað er greitt komið til sjóndar gjøgnum samrøður og greiningararbeiði. Tó verða hesi viðurskifti millum lítið og einki umrødd í gerandisdegnum. Har kýta tey seg, royna at lurta væl eftir og nýta ymsan teknikk fyri ikki at órógva og irritera hini og gera treyðugt vart við sína avbjóðingar.

Skúlanæmingar hava trupulleikar við nógvum larmi, ójavnari atkomu til undirvísingartilfar og óskipaða mannagongd í sambandi við kunning. Hetta kann gera skúladagin tungan at koma í gjøgnum. Tey hava øll vinir og eru við í spæli og samspæli, hóast tað krevur nógv av teimum og vinfólkunum, tí tær smáu samráðingarnar eru lættar at misskilja.

Tey millum 18 og 67 ár vóru ávirkað av negativum minnum um fyrsta tíðarskeiði, har tey fingu hoyritól, og útsagnir hjá lærarum hava ávirkað sjálvsfatanina hjá tí einstaka. Orkan, sum ikki røkkur í gerandisdegnum, hevur við sær, at føðingardagar og onnur sosial tiltøk verða vald frá til fyrimuns fyri at kunna fara til arbeiðis.

Í aldursbólkinum yvir 67 ár vísti tað áhugaverda seg, at eingin teirra, ið meldaði seg til verkætlanina, hevði hoyritrupulleikar sum barn ella ungur. Hesi hava sjálvsagt allan rætt at vera við og hava tøkk uppibornað, men áhugavert er, at tey, ið hava liva longst og hava drúgvastu royndirnar við niðursettari hoyrn, ikki vístu áhuga fyri at vera við.

Møguliga er svarið at finna hjá teimum millum 18 og 67 ár og teirra frágreiðing um teknikk, har ein sigur: Eftirhondini so lukkar mann bara av. Tað hevur mann lært seg. Mann letur bara vera við at hyggja inn í eyguni á fólki, tí annars halda tey, at tú ert við í samrøðuni, ella fara at siga okkurt við teg. Tá er tað ordiliga soleiðis „eg eri ikki við her …“ (5, 2020).

Avbjóðingarnar hjá heimildarfólkunum yvir 67 ár vóru serliga merktar av broyttum samskiftisumstøðum og sosialum afturhaldi.

Hóast niðursetta hoyrnin hevur víðfevnda ávirkan á gerandisdagin hjá øllum heimildarfólkunum í hesi verkætlan, hevði eingin teirra sett seg inn í viðurskiftir, ið kunnu bøta um hoyriviðurskiftini við hús, í skúlanum ella á arbeiðsplássinum. Eingin teirra var limur í felagnum Hoyr.

Vísandi til umfatandi niðurstøðurnar í tí donsku kanningini hjá SFI, hevði bara ein niðurskurð í arbeiðstíð orsakað av hoyrnini. Í Føroyum er eingin almennur ráðgevi til fólk, ið hava niðursetta hoyrn. Einasta ráðgeving, sum fólk ið hava niðursetta hoyrn, kunnu fáa, er í sambandi við oyra-, nøs- og hálslæknan ella audiologiassistent, tá ið ein skal hava ella fáa stillað síni hoyritól.

„Eftirhondini so lukkar mann bara av. Tað hevur mann lært seg. Mann letur bara vera við at hyggja inn í eyguni á fólki, tí annars halda tey, at tú ert við í samrøðuni, ella fara at siga okkurt við teg. Tá er tað ordiliga soleiðis „eg eri ikki við her ...“



# 9.0

# Grundhugsan um verkætlanar-tilgongdina

Eitt spennandi tíðarskeið er komið at enda, og vónandi hevur tú sum lesari fingið innlit í lív og avbjóðingar hjá fólki, ið hava niðursetta hoyrn.

Tá ið lýst var við verkætlanini, gleddust fólk um, at ljós endiliga var varpað á avbjóðingina, ið so nógv hava, men sum fá tosa um og eingin sær. Heimildarfólkini høvdu øll nógv á hjarta og toktist vera fegin um møguleikan fyri at greiða frá sínum lívsumstøðum við tí vón at, tað kann hava batar á hoyriøkinum við sær.

Fyri og eftir ta hálvskipaðu samrøðuna, vóru nógvir spurningar til verkætlanarleiðara. Tað vóru spurningar um niðursetta hoyrn, um Felagið Hoyr, um tað hevði verið leingi. Tey flestu høvdu ongantíð hoyrt um felagið og vistu ikki, hvat felagið arbeiðir við, ella hvussu ein kundi gerast limur.

Spurt varð um munin á Hoyriklinikkini og Hoyrnini, hví summi skulu gjalda og onnur fáa tólini so bíliga, og til seinast um nakar kundi svara upp á spurningar um ymist, sum er knýtt at niðursettari hoyrn. Fleiri fingu eina kenslu av at órógva ella taka tíð frá fólki, ið hevði annað og meiri týðandi at taka sær til. Tað var serliga í sambandi við lærarar, audiologiassistentar og oyra-, nøs- og hálslæknan.

Spurningarnir vísa tørvin á kunnandi tilfari og á fakfólki og/ella stað, hagar fólk kunnu venda sær við spurningum, ið stinga seg upp.

Verkætlanin hevði til endamáls at svara upp á spurningin um, hvussu lívsumstøðurnar hjá fólki, ið hava niðursetta hoyrn, eru, og tær avbjóðingar, teimum eru fyri í gerandisdegnum, og tað er svarað. Í tilgongdini er viðkomandi vitan hjá ávísum fakbólkum fingin til vega, og hóast tað ikki er partur av spurninginum, verður tað hildið at vera viðkomandi og verður lagt sum ískoytið til verkætlanina.

**Ískoyti til verkætlanina**

Í samskiftinum fyri og eftir ta hálvskipaðu samrøðuna, umrøddi heimildarfólk og foreldur at teimum ungu undir 18 ár ymisk viðurskifti hjá ávísum fakbólkum. Fimm heimildarfólk nevndu óítøkiligar væntanir til onkran, ein persón, stað ella skipan, ið kundi lofta, svara spurningum og/ella líknandi, nú viðkomandi og familjan vóru nýggjum umstøðum í sambandi við ta niðursettu hoyrnina.

Eitt av ungu heimildarfólkunum segði, at onkur átti at komið í skúlan og fortalt næmingunum, hvussu tað er, altso tosaði við okkum, og eisini bara hava eina lítla undirvísing fyri lærarar. Tað manglar øgiligt (3, 2020).

Eitt av heimildarfólki hevði tól frá Hoyriklinikkini á Landssjúkrahúsinum, og tólið hevði ikki verið stillað av nýggjum í fleiri ár. Viðkomandi væntaði, at tey (á Hoyriklinikkini) helst fóru at seta seg í samband við seg, tá ið tólið skuldi stillast. Spurd/ur um viðkomandi sjálv/ur hevði sett seg í samband við tey, varð svarað: Nei, tað havi eg ikki gjørt (10, 2020).

Eini foreldur vóru ørkymlað um ta longu tíð, frá tí at tey sum foreldur ivaðust í, um barnið hoyrdi illa, og til niðursetta hoyrnin varð staðfest, og barnið fekk hoyritól. Teimum manglaði somuleiðis onkran at tosa við ella spyrja um ráð: Barnið hevur ofta haft oyravoks, so læknin helt, at tað mundi vera tí. So fekk barnið dren, men ikki fyrr enn tað fór í 1. flokk, fekk tað hoyritól. Men vit fingu onga information, vit fingu einki at vita um nakað felag, ella hvønn mann kundi tosa við. Tað saknaðu vit ... (Foreldur, 2020).

Millum annað út frá hesum útsagnum, kom spurningurin um, hvør eigur uppgávuna at fara út á skúlar og arbeiðspláss og kunna um ta niðursettu hoyrnina. Hvør hevur ábyrgd av at læra viðkomandi at liva við tí niðursettu hoyrnini.

Tí varð avgjørt at hava samrøður við fakfólk á hoyriøkinum, og tær vórðu gjørdar í november og desember 2020. Samrøður vóru við yvirlæknan á oyra-, nøs- og hálsdeildini og audiologiassistent á Hoyriklinikkini á Landssjúkrahúsinum, stjóran á Hoyrnini og stjóran og hoyri- og talulærarar á Sernámi, umframt forkvinnuna í Felagnum Hoyr.

Fyrst ein heilt stutt lýsing av teimum ymisku skipanunum, sum hesi fakfólk arbeiða út frá. Luhmann (1927-1998) var týskur samfelagsfrøðingi og kendur fyri sítt arbeiddi við sosiologiskum skipanarástøði. Luhmann nýtir eina deiling, so at talan antin er um eitt system ella umheim. Ein sundurskiljing, har tosað verður um tey, sum eru innanfyri, og hini, sum eru uttanfyri. (Qvortrup, Introduktion til Niklas Luhmanns pædagogiske teorier, 2006).

Luhmann tosar um tríggjar høvuðsskipanir: samskiftis-, bygnaðar- og samfelagsskipan. Tað eru ymiskar treytir fyri skipanirnar hvør sær, tó at allar á ymiskan hátt eru knýttar at ávísum atburði, hugsingarhátti samskifti, og at tað gevur meining at vísa til hvønn annan og harvið avmarka seg í eina skipan, sum avmarkar seg frá umheiminum. Allar skipaninar eru sjálvskapandi (autopoietiskar) og sjálvtilvísandi. Hetta merkir, at fólk, sum eru innanfyri eina skipan, nýta ymsar miðlar og kodur, sum eru sjálvsagdar fyri hini í bólkinum og kunnu vera óskiljandi hjá øðrum.

Verður hugt at fakfólkunum, so umboða tey ymiskar hugsanir. Oyra-, nøs- og hálslæknin tekur støði í vitan í læknavísindum. Audiologiassistenturin á Hoyriklinikkini tekur støði í teknikki. Stjórin á Hoyrnini tekur støði í keyp og sølu og forkvinnan í Hoyr umboðar eitt áhugafelag, ið kann sigast at umboða eina samskiftisskipan. Hetta kann sambært Qvortrup setast upp í ein frymil og vísir tær ymisku skipanirnar, sum Luhmann umtalar.

| | Skipan | Miðil | Kota | Hugsan |
|---|---|---|---|---|
| Oyra-, nøs- og hálslækni | Heilsuverk | Heilsa | Frískur/sjúkur | Læknavísindi |
| Audiologi-assistentur á Hoyriklinikkini | Almenn Hoyriklinikk | Hoyrn | Hoyra +/- | Tøkni |
| Stjórin í Hoyrnini | Privat fyritøka | Søla/vinningur | Hoyra +/- | Kundatænasta |
| Tali/hoyrilærarar Sernám | Sernámsfrøðingar Ráðgeving | Menning | Hoyrn/ málmenning +/- | Rættindi |
| Forkvinnan í Hoyr | Áhugafelag | Avbjóðingar | Atkoma +/- | Rættindi |

(Qvortrup, Det hyperkomplekse samfund, 1998)

Her sæst, hvussu ymisk økini eru. Undir skipan er heilsuverk, almenn hoyriklinikk privat fyritøka, sernámsfrøðilig ráðgeving og áhugafelag. Tá hesi samskifta við hvørt annað, kunnu tey hava ilt við at lata upp fyri hvørjum øðrum og hava innlit í og fatan av viðurskiftinum hjá hvørjum øðrum.

Um tær ymisku skipanirnar, sum starvsfólkini á ávikavist oyra-, nøs- og hálsdeildini, Hoyriklinikkini, Hoyrnini, Sernámi og Hoyr hvør í sínum lag skulu samskifta við, krevur tað eina bygnaðarliga kopling[7]. Tað er, tá ið tað verður eitt skipað samanfall millum eitt system og umverðina. Tá ið systemini hava eina bygnaðarliga kopling, merkir tað, at tey arbeiða við tí sama, men upp á hvør sín máta (Qvortrup, Introduktion til Niklas Luhmanns pædagogiske teorier, 2006).

Hetta kann vera atvoldin til, at einstaklingar og fakbólkar tosa og ynskja sær menning, tó uttan virknað. Tey samskifta við innanhýsis skipanir og mangla tað bygnaðarligu koblingina, ið tykist vera ein treyt fyri at ávirka og skapa menning millum skipanirnar.

Við teimum ymisku skipanunum í huga vóru fakfólkini biðin um at lýsa kjarnuuppgávuna á staðnum, hvussu brúkararnir verða umrøddir, og hvør eftir teirra tykki hevur ábyrgd av at læra viðkomandi at liva við niðursettu hoyrnini. Hetta fyri at vísa at ymisleikin ávirkar hugburin hjá fakfólki og harvið tann atburð viðkomandi hevur og vísur yvir fyri brúkarunum.

Tey nógv styttu svarini frá fakfólkum eru sett inn í ein frymil og tað er ymist, hvussu nógv niðursett hoyrn fyllir í gerandisdegnum. Hjá yvirlæknanum á oyra-, nøs- og hálsdeildini hoyrir tað at hava niðursetta hoyrn til ein lítlan sjúklingabólkur, og somuleiðis fyllir niðursett hoyrn lítið á Sernámi, meðan audiologiassistentarnir á ávikavist Hoyriklinikkini og Hoyrnini arbeiða við hoyrn, tøkni og fyribyrging ein stóran part av degnum.

---

[7] Strukturel kobling

Við teimum ymisku skipanunum í huga vóru fakfólkini biðin um at lýsa kjarnuuppgávuna á staðnum, hvussu brúkararnir verða umrøddir, og hvør eftir teirra tykki hevur ábyrgd av at læra viðkomandi at liva við niðursettu hoyrnini. Hetta fyri at vísa at ymisleikin ávirkar hugburin hjá fakfólki og harvið tann atburð viðkomandi hevur og vísur yvir fyri brúkarunum.

Tey nógv styttu svarini frá fakfólkum eru sett inn í ein frymil og tað er ymist, hvussu nógv niðursett hoyrn fyllir í gerandisdegnum. Hjá yvirlæknanum á oyra-, nøs- og hálsdeildini hoyrir tað at hava niðursetta hoyrn til ein lítlan sjúklingabólkur, og somuleiðis fyllir niðursett hoyrn lítið á Sernámi, meðan audiologiassistentarnir á ávikavist Hoyriklinikkini og Hoyrnini arbeiða við hoyrn, tøkni og fyribyrging ein stóran part av degnum.

Áhugavert er at leggja merki til, hvussu fólk verða umtalað á teimum ymisku økjunum. Sí talvu á næstu síðu.

Spurningurin var: Hvat kalla tit tykkara brúkarar? Svarað varð sjúklingar, patientar, kundar og børn.

- At vera sjúklingur er føroyska orðið fyri patient, sum er úr látíni og merkir at vera líðandi, tolin og í viðgerð (Sproget.dk, 2020).
- At vera kundi, ið kemur úr aldargomlum týskum, at vera kukundo, ið merkir at vera ein kenningur. At vera kundi er ein persónur, ið keypir, ella ætlar at keypa eina vøru ella tænastu (Ibid).
- At vera barn, merkir menniskja, sum er í fyrsta parti av lívinum frá føðing til kynsbúning. Menniskja hevur nógvar útleggingar, millum annað at vera einstaklingur, skynsamur, siðmentur persónur, ið hevur kenslur og gevur og krevur virðing og javnsetta viðferð (Ibid)

T.v.s., at á hoyriøkinum eru ymsar skipanir við eldhugaðum fakfólki, ið gera sítt besta, men eru partar av ymsum skipanum, har brúk er fyri eini bygnaðarligari kobling fyri at røkka hvønn annan.

Tað er eingin, ið eigur, leiðir ella stýrir hoyriøkinum í ein ávísan rætning. Teir ymsu aktørarnir á økinum tosa út frá sera ymiskum skipanum og sjónarhornum og hava tí ilt við at taka undir við útsagnum hjá hvørjum øðrum.

Oyra-, nøs- og hálslæknin, forkvinnan í Hoyr og stjórin í Hoyrnini mæltu í samrøðunum til ein samskiftisdepil, ið skal vera knýttur at Mentamálaráðnum, Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum og Vinnumálaráðnum. Fólk, ið hava niðursetta hoyrn, eru á ymsan hátt knýtt at teimum ymisku ráðunum.

| | Yvirlækni | Hoyriklinikkin | Hoyrnin | Sernám | Hoyr |
|---|---|---|---|---|---|
| Uppgáva | At taka okkum av oyra-, nøs- og hálsviður-skiftum. Tað eru nógvir ymiskir sjúklingabólkar. Alt frá hoyrn, snorut nøs til krabbamein. Tað er ein oyra-, nøs- og hálslækni til til 53.000 fólk. Samanborið við Danmark áttu vit at verið 3 læknar. | Deild, ið hjálpir fólki við niður-settari hoyrn. Sum sjúkrahús hugsa vit mest um børnini og tey, sum eru sjúk, men annars skulu vit útfylla hoyritap hjá einum og hvørjum før-oyingi. So øll kunnu koma higar. | Hoyrnin er ein privat hoyri-klinik, ið tekur sær av fólki, sum eru 18 ár og eldri. Hoyrnin selir hoyritól, men tekur sær eisini av øllum á tí audiologiska økinum. Vit selja hoyriloysnir, her dygdin er í hásæti. | Sernámsfrøðilig ráðgeving og stuðul til starvs-fólk á stovni og skúla frá 0 til 18 ár.<br>Við atliti at børn-um við niður-settari hoyrn ráðgeva vit um málmenning, innrætting, samskifti við barnið, minka um frástøðu o.s.fr. | Hoyr er eitt felag fyri fólk, ið hava eitthvørt hoyri-brek. At vísa á tey rættindi, sum vit sum deyv hava. At vísa á at allir almennir stovnar skulu hava í huga, at øll kunnu fylgja við. |
| Umtala | Hoyr er eitt felag fyri fólk, ið hava eitthvørt hoyri-brek. At vísa á tey rættindi, sum vit sum deyv hava. At vísa á at allir almennir stovnar skulu hava í huga, at øll kunnu fylgja við. | Patientar | Kundar | Børn við ella hava niðursetta hoyrn, CI, ella BaHa. | Fólk (við niður-settari hoyrn). |
| Ábyrgd | Mann kann siga, at øll hava eina vissa ábyrgd, eina sjálvsábyrgd, sama hvat tað er, men mann má kunna fáa hjálp ella ráðgeving, tá ið trupulleikarnir eru størri, ella um viðkomandi er í starvi og er í ferð við at missa tað ella í ferð við at fara í starv. Tað er helst ein samfelagsupp-gáva. | Tað er patient-urin. Ella sama hvat hendir tær í lívinum, so mást tú læra at liva við tí. | Vit hava ábyrgd-ina av okkara kundum. Tað eigur ikki at vera Hoyr ella Deyvafelagið. Tað átti at verið ein stovnur við fakfólki, sum fólk kunnu venda sær til við spurning-um. Tað veri seg v.v. arbeiði, eftirútbúgving, og um hevur viðkomandi brúk fyri skrivitulk, ella hjálpartóli o.s.fr. | Móttakari av okkara ráðgeving eru fyrst og fremst starvsfólk á stovnum og í skúla. So at tosa vit um stovn og skúla og fak-fólkini har, so eiga vit í hvussu er ein part av uppgávuni. Spurningurin er kanska meiri, um skipanir megna upp-gávurnar, og um tær hanga saman, og um uppgávurnar eiga at liggja hjá Sernámi. | Hoyr eigur at skipa fyri tiltøkum og líknandi fyri at fólk kunnu læra at liva við og góðtaka tað støðu, tey eru í.<br>Vit áttu at haft ein samskiftis-depil, tí at so kundi mann haft psykolog knýttan at deplinum. |

**10.0**

# Bibliografi

Socialstyrelsen. (2019). Rehabilitering og undervisning af børn og unge med tidligt konstateret høretab 0-18 år. Odense: Socialstyrelsen.

1. (2. November 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

10. (5. November 2020). Samrøða. (Majbritt, Interviewer)

2. (2. Desember 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

3. (21. Oktober 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

4. (16. Oktober 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

4. (16. Oktober 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

5. (13. Oktober 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

6. (14. Oktober 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

7. (20. oktober 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

8. (20. November 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

9. (14. November 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

Alfred L Nuttall, A. J. (2018). A Mechanoelectrical mechanism for detection of sound envelopes in the hearing organ. *Nature Communications*.

Almannamálaráðið. (11. November 2008). Kunngerð nr. 96 frá 11. november 2008 um stuðul til hoyritól, sum broytt við kunngerð nr. 21 frá 3. apríl 2013. Føroyar.

Bo Jacobsen, L. T. (2010). Fænomenologi. I L. T. Brinkmann, *Kvalitative Metoder* (s. 185-205). Hans Reitzels Forlag.

D. (2. Desember 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

Danmarks Læringsportal. (5. Februar 2021). *Børne og undervisningsministeriet*. Hentet fra Danmarks Læringsportal: https://emu.dk/dagtilbud/det-paedagogiske-grundlag/leg

Deyvafelag Føroya. (08. oktober 2020). *Deaf.fo*. Hentet fra Deyvafelag Føroya: http://deaf.fo/?p=19&l=fo

Ellefsen, B. (11. Desember 2020). Yvirklækni . (M. Jacobsen, Interviewer)

F. (21. Oktober 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

Folkman, R. S. (1984). *Stress, appraisal and coping*. New York: Springer Publishing Company.

Force Technology. (4. Februar 2021). *Force Technology*. Hentet fra Forcetechnology: https://forcetechnology.com/da/ydelser/hoereapparater-teknisk-audiologi-testhus

Foreldur. (2. november 2020). Samrøða. (Majbritt, Interviewer)

Hansen, E. P. (14. November 2014). Føroykst teknmál er ikki góðkent sum mál . Tórshavn, Føroyar.

Hansen, M.-B. M. (1998). *Sproglig høflighed.* København: Københavns Universitet.

Helgadóttir, J. (19. November 2020). Stjóri. (M. Jacobsen, Interviewer)

Holmelund, M. (8. Oktober 2019). Speciallæge . Danmark.

Hoyr-felagið fyri hoyribrekað í Føroyum. (1992). *Viðtøkur felagsins*. Tórshavn: Hoyr.

Hoyriklinikkin. (15. mai 2020). audiologiassistentur. (Majbritt, Interviewer)

Høreforeningen. (29. mai 2020). Hentet fra Høreforeningen: https://hoereforeningen.dk/viden-om/hoereproblemer/

Høreforeningen. (14. desember 2020). *Høreforeningen.* Hentet fra Høreforeningen: https://hoereforeningen.dk/viden-om/ci-og-bahs/cochlear-implant/

Haanes, G. G. (2016). *Hearing, vision, and lighting conditions among older recipients of home care.* Oslo: Universitet Oslo.

Juul, H. (2015). *Rapport om læse og skrivefærdigheder hos voksne med høretab.* København: CASTBERGGÅRD JOB- & UDVIKLINGSCENTER.

K. (2. November 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

Karpatschof, B. (2010). Den kvalitativeundersøgelsesforms særlige kvaliteter. I S. B. Tanggaard, *Kvalitative metoder - en grundbog* (s. 409-428). København: Hans Reitzels Forlag.

Lena Bech Larsen, M. S. (2014). *Døve og døvblevne mennesker - hverdagsliv og levevilkår.* København: SFI - Det nationale forskningscenter for velfærd.

Liða, H. í. (11. Desember 2020). Audioligiassistentur. (M. Jacobsen, Interviewer)

Ma. (14. Oktober 2020). Samrøða. (M. Jacobsen, Interviewer)

Merete Osler, G. T. (10. Oktober 2018). Høretab, kognitiv evne og demens hos mænd i alderen 19–78 år. E*uropean Journal of Epidemiology,* s. 125-130.

Nám. (15. apríl 2020). Námsfrøðiligur ráðgevi. (M. Jacobsen, Interviewer)

Olesen, S. G. (4. December 2008). Italesættelse: Historien om et ord . Fredriksberg, Danmark.

Olsen, Á. (29. November 2020). Forkvinna í Hoyr. (M. Jacobsen, Interviewer)

Oticon. (24. 06 2020). *Oticon.* Hentet fra Oticon: https://www.oticon.dk/hearing-aid-users/hearing-loss/understand-hearing-loss/how-hearing-works

Oyrna-nasa-hálsdeild. (7. Januar 2021). *Landssjukrahúsið*. Hentet fra Hoyrna-nasa-hálsdeild: https://ls.fo/deildir/kliniskar-deildir/oyrna-nasa-h%C3%A1lsdeild/

Qvortrup, L. (1998). *Det hyperkomplekse samfund*. Gyldendal.

Qvortrup, L. (2006). *Introduktion til Niklas Luhmanns pædagogiske teorier.* København: Hans Reitzels Forlag.

Riemer, M. (Mai 2008). Nøglen til lsproget ligger i øret. *Dansk Audiologopædi*, s. 11-16.

Sameindu Tjóða. (13. desember 2006). ST - sáttmálin um rættindi teirra brekaðu.

Sharma, H. A. (18. Februar 2020). Cortical Neuroplasticity and Cognitive Function in Early-Stage, Mild-Moderate Hearing Loss: Evidence of Neurocognitive Benefit From Hearing Aid Use. *Frontiers in Neuroscience.*

Socialforskningsinstituttet. (2003). Når hørelsen svigter. København K: Socialforskningsinstituttet.

Socialstyrelsen. (20. januar 2020). *Socialstyrelsen.* Hentet fra Socialstyrelsen: https://socialstyrelsen.dk/handicap/horehandicap/om-horehandicap

Sproget.dk. (22. Desember 2020). Sproget.dk.

Steensig, J. (2009). Konversationsanalyse. I S. B. Tanggaard, *Kvalitative metoder - en grundbog* (s. 287-313). København: Hans Reitzels Forlag.

Stine Weiersøe Villadsen, H. L. (2013). *Jo vi kan* . København K: Videnscenter for Handicap, Hjælpemidler og Socialpsykiatri, 2013.

Tanggaard, S. B. (2010). *Kvalitative metoder* . København: Hans Reitzels Forlag.

Teknmálstulkatænastan. (5. Februar 2021). *Teknmálstulkatænastan.* Hentet fra Almannaverkið: https://www.av.fo/fo/taenastur/teknmalstulkataenastan/

Thomsen, P. H. (04. Apríl 2020). *Sundhed.dk.* Hentet fra Sundhed.dk: https://www.sundhed.dk/borger/patienthaandbogen/psyke-hos-boern/sygdomme/adhd/adhd-symptomer-og-tegn/

Videnscenter for hørehandicap. (2007). *Børn i med og modvind - Hvad kan skolen gøre for, at brn med høretab trives bedst muligt?* Virum: Videnscenter for hørehandicap.

Wenger, E. (2004). *Praksisfællesskaber.* Hans Reitzels Forlag.

# 11.0
# Fylgiskjøl

# FYLGISKJAL 1

| KANNINGARSPURNINGAR | SAMRØÐUSPURNINGAR |
|---|---|
| Meðan vit tosa, vil eg í mest møguligan mun minka um mín mimikk, ikki smílast, nikka, undrast og líknandi. Hetta fyri at ávirka svarini sum minst, og eg kunni teg um tað frammanundan soleiðis, at tú ikki verður ótrygg við, at eg ikki tykist ávirkað. | |
| Inneftirlýtandi | Kanst tú greiða frá, hvussu tað er at liva við niðursettari hoyrn? |
| Hvussu ávirkar niðursetta hoyrnin gerandisdagin hjá tí einstaka | Kanst tú greiða frá, hvussu tað er at liva við niðursettari hoyrn? |
| Úteftirlýtandi<br><br>Sosiala samveran | Kanst tú greiða frá, hvussu niðursetta hoyrnin ávirkar títt sosiala lív?<br><br>— Hvar hevur tú størstu avbjóðingar? Í arbeiðstíð ella frítíð?<br>— Luttekur tú í frítíðarvirksemi so sum ítrótti, tónleiki ella líknandi?<br>— Luttekur tú í almennum tiltøkum, tónleiki, sjónleiki, fyrilestrum o.ø.? |
| Hvussu upplivir viðkomandi, at onnur bera seg at við fólki, ið hava niðursetta hoyrn? | Kanst tú greiða frá, hvussu niðursetta hoyrnin ávirkar títt sosiala lív?<br><br>— Hvar hevur tú størstu avbjóðingar? Í arbeiðstíð ella frítíð?<br>— Luttekur tú í frítíðarvirksemi so sum ítrótti, tónleiki ella líknandi?<br>— Luttekur tú í almennum tiltøkum, tónleiki, sjónleiki, fyrilestrum o.ø.? |
| Hvussu fatar og umtalar viðkomandi sítt hoyritarn? | Eingin spurningur. Støði verður tikið í møguligum útsagnum hjá viðkomandi |
| Atkoma | — Fært tú alt við í gerandisdegnum? (Alt av týdningi)<br>— Fært tú alt við í útvarpi/sjónvarpi?<br>— Hugsar tú um, hvørt sendingar í sjónvarpi hava tekst ella ikki?<br>— Hevur tú nakrantíð nýtt skrivitulk?<br>— Hugsar tú um, hvussu tú sjálv/ur kanst bøta um hoyriviðurskifti hjá tær í gerandisdegnum?<br>— Gert tú nakað serligt fyri at tryggja, at tú fært alt við soleiðis, at tú kanst javnmetast við hoyrandi á arbeiðsplássinum?<br>— Hvørs ábyrgd heldur tú tað er, at tú fær alt við? |
| Spurningar, ið knýta seg at vitan um hoyritarnið og tøkni | — Hvussu leingi hevur tú haft niðursetta hoyrn?<br>— Hvussu gjørdist tú varugur við, at tú hevði niðursetta hoyrn?<br>— Kanst tú greiða frá tíni vitan um niðursetta hoyrn, hoyritól og líknandi?<br>— Ert tú limur í HOYR? Hví, hví ikki?<br>— Nýtir tú onnur hjálpartól í gerandisdegnum í sambandi við niðursettu hoyrnina? |
| Orka | Nýtir tú nógva orku at lurta eftir, vera við í samrøðum?<br><br>Heldur tú teg verða troyttari enn onnur, tá ið dagurin er at enda komin? |

# FYLGISKJAL 2

## Kunningarskriv til luttakarar í verkætlan

Felagið Hoyr er farið undir eina kvalitativa verkætlan til tess at fáa størri innlit í hoyribrekøkið, soleiðis, sum tað sær út í 2020.

Tað at hoyra, fylgja við og vera partur av samfelagnum er av alstórum týdning fyri sálarheilsuna hjá fólki. Tá metast skal um, hvussu nógv hava trupulleikar við hoyrini, verður støðið tikið í donskum og altjóða hagtølum, og sambært hesum hagtølum hevur sættihvør ella umleið 8.000 føroyingar hava eitthvørt hoyritarn (Høreforeningen, 2020). T.v.s., at ein stórur partur av Føroya fólki hevur dagliga trupulleikar við at hoyra, fylgja við í samrøðum, fylgja við í tíðindaflutningi og verða javnbjóðis partur av samfelagnum.

Hetta er óheppið, og tí er Hoyr farið undir eina verkætlan, hvørs endamál er at fáa vitan og innlit í hoyribreksøkið og soleiðis arbeiða málrætta við at bøta um viðurskiftini hjá fólki við hoyribreki.

Felagið Hoyr er eitt áhugafelag, ið varð sett á stovn í 1992 við tí endamálið, at dagligu umstøðurnar hjá hoyrbrekaðum skulu vera so góðar sum gjørligt (Hoyr-felagið fyri hoyribrekað í Føroyum, 1992).

Felagið hevur verið virkið øll árini.

Við støði í verkætlanini og vitan um lívskor og avbjóðingar hjá fólki við niðursettari hoyrn lítur nevndin í Hoyr frameftir fyri at vera før fyri at ávirka avgerðir, ið knýta seg at hoyribreksøkinum og soleiðis tryggja betri lívsgóðsku og heilsufremjandi tiltøk fyri henda samfelagsbólkin.

Tí verður heitt á teg um at vera við í eini skipaðari samrøðu, ið tekur í mesta lagi ein tíma. Tað verður Majbritt Jacobsen, ið stendur fyri samrøðuni, sum kann vera í egnum heimi ella heima hjá Majbritt.

# FYLGISKJAL 3

## Samtykkisskriv

Dato ../../....

Síða 1 av 1

Samtykkisváttan

| | |
|---|---|
| Dátuábyrgdari: | Majbritt Jacobsen |
| Heiti á verkætlan: | Hoyribrekøkið 2020 |
| Vegleiðari: | Ása Róin |

Hoyr – felagið fyri hoyribrekað í Føroyum – er farið undir eina kvalitativa verkætlan fyri at fáa vitan um og innlit í tað at liva við niðursettari hoyrn. Innlit í hvussu niðursett hoyrn ávirkar gerandisdagin hjá tí einstaka, tað veri seg í skúla, arbeiði og á ellisheimi.

Fyri at fáa vitan um og innlit í tað at liva við niðursettari hoyrn, er avgjørt at nýta hálvskipaða samrøðu sum mannagongd. Við hesi mannagongd ber til at stýra samrøðuni og tryggja eina so nágreiniliga og avmarkaða vitan um upplivingini av at liva við niðursettari hoyrn, at samrøðan kann ganga inn í greiningararbeiðið og soleiðis kann nýtast til at orða eina samanhangandi og umboðandi triðjapersónslýsing (Tanggaard, 2010).

Eg loyvi við hesum, at

Hoyr og verkætlanarleiðari kann nýta samrøðuna við meg í sambandi við verkætlanina Hoyribrekøkið 2020.

Eg loyvi at samrøðan verður nýtt í verkætlanini.

Samrøðan verður tikin upp, ljóðskrivað og greinað, og at tað upptikna og ljóðskrivaða tilfarið síðan og í seinasta lagi 31. desember 2020 verður trygt burturbeind

Samtykkið kann nær sum helst takast aftur við virknað fyri framtíðina.

Samtykkið kann takast aftur við at venda sær til verkætlanarleiðara, Majbritt Jacobsen, á telefon 518758 ella enghamar@kallnet.fo.

Dato

______________________________

Navn

______________________________

Undirskrift

______________________________

# FYLGISKJAL 4

Kunngerð um stuðul til hoyritól, ið seinast varð broytt við kunngerð nr. 218 frá 28. desember 2020

| | |
|---|---|
| Kapittul 1 | Hoyritól |
| Kapittul 2 | Umsiting |
| Kapittul 3 | Vanligar treytir |
| Kapittul 4 | Privatir veitarar |
| Kapittul 5 | Umbýti og leiðbeining |
| Kapittul 6 | Kærumyndugleiki |
| Kapittul 7 | Gildiskoma |

1) 2) Við heimild í § 30, stk. 6 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur verður ásett:

## Kapittul 1

## Hoyritól

§ 1. Stuðul til hoyritól verður veittur til persónar, ið hava varandi niðursetta hoyrn og eru vístir til hoyritólaviðgerð av serlækna í oyra-, nøs- og hálssjúkum, um hesi:

1. eru neyðug fyri at brúkarin kann vera í vinnu,
2. munandi bøta um hoyrnina hjá brúkaranum ella
3. lætta munandi um í gerandisdegnum hjá brúkaranum.

§ 2. Við hoyritól eftir hesi kunngerð er at skilja smærri tól sum t.d.:

1. digital hoyritól
2. tinnitusmaskur
3. hørat
4. oyrnaproppar
5. hoyrivernd og
6. fjarstýrarar

Stk. 2. Umframt tólini sbrt. stk. 1 er við hoyritól eftir hesi kunngerð at skilja hjálpartól, ið eru neyðug fyri at hoyritólið kann nýtast sum t.d.:

1. FM-tól og
2. telesleingjur

## Kapittul 2

## Umsiting

§ 3. Hoyriklinikkin á Landssjúkrahúsinum kann eftir umsókn útvega hoyritól sbrt. § 2, stk. 1.

Stk. 2. 3) Hoyriklinikkin veitir brúkaranum bíligasta nøktandi hoyritólið og tekur avgerð um, hvat best hóskandi og bíligasta hoyritólið er. Umsøkjarin rindar sjálvur kostnaðin, tó í mesta lagi 2.000 kr. fyri hvørt hoyritól.

Stk. 3. Kanningar á Hoyriklinikkini, viðlíkahald og umvælingar av hoyritólum eru fevnd av veitingini.

Stk. 4. Battarí og filtur eru ikki fevnd av veitingini.

Stk. 5. Hoyritól er ogn hjá brúkaranum.

§ 4. 3) Umsøkjari, sum er 18 ár ella eldri, ið velur at nýta góðkendan privatan veitara av hoyritólum, kann í staðin søkja um stuðul frá Hoyriklinikkini á Landssjúkrahúsinum til at keypa hoyritól fyri sbrt. § 2, stk. 1. Stuðulin er í mesta lagi 4.000 kr. fyri hvørt hoyritólið.

Stk. 2. Stuðulin kann tó ikki vera størri enn veruligu útreiðslurnar til at veita hoyritól íroknað kanning, viðlíkahald og umvælingar.

Stk. 3. Stuðulin kann ikki fevna um útreiðslur til battarí og filtur.

Stk. 4. Hoyritól sum stuðul verður veittur til eftir stk. 1, er ogn hjá brúkaranum.

§ 5. Hoyriklinikkin á Landssjúkrahúsinum hevur skyldu til at gera skrá yvir hvønn einstakan

brúkara og at skráseta, tá ið nýtt hoyritól ella stuðul til slíkt verður veittur brúkaranum.

§ 6. Hoyriklinikkin á Landssjúkrahúsinum kann eftir umsókn útvega serliga útgerð til hoyritól sbrt. § 2, stk. 2.

Stk. 2. Útgerðin kann útvegast til arbeiðspláss, tá ið útgerðin er neyðug fyri, at persónur kann vera í vinnu.

Stk. 3. Útgerðin kann ikki útvegast til stovnar ella sambýli.

§ 7. Hoyriklinikkin kann eftir umsókn útvega brúkara, sum er undir 18 ár, ella sum ikki kann vera hoyritól fyri uttan í styttri tíðarskeið, eyka hoyritól sbrt. § 2, stk. 1.

## Kapittul 3

## Vanligar treytir

§ 8. Stuðul sambært §§ 3 og 4 kann ikki verða veittur oftari enn fjórðahvørt ár, roknað frá tí degi, tá ið brúkarin kundi taka seinasta hoyritólið í nýtslu. Hetta er eisini galdandi fyri hoyritól, sum eru játtað, áðrenn henda kunngerð kom í gildi.

Stk. 2. Stuðul kann veitast aftur innan 4 ár:

1. um hoyrnin eftir lækinaligari meting er týðiliga versnað,
2. um hoyritólið ikki longur kann nýtast vegna slit ella likamligar broytingar,
3. um hoyritólið er mist vegna stuldur, eldsbruna ella líknandi, og trygging eigarans ikki tekur við, ella
4. um brúkarin er undir 18 ár, tá ið umsóknin verður latin inn.

Stk. 3. 3) Um tørvur er á nýggjum hoyritóli innan 4 ár orsakað av umstøðum, sum ikki eru fevndar av stk. 2, og sum ikki kunnu lastast brúkaranum, kann stuðul kortini verða veittur sambært § 4. Stuðulin kann tá í mesta lagi vera 2.000 kr. fyri hvørt hoyritól.

§ 9. Hoyritól, sum brúkari hevur útvegað sær, áðrenn umsókn er játtað, koma ikki undir ásetingarnar í hesi kunngerð.

## Kapittul 4

## Privatir veitarar

§ 10. Stuðul eftir § 4, stk. 1 verður bara veittur, um privati veitarin av hoyritólum er góðkendur av Landslæknanum.

Stk. 2. 2) Umsóknir um góðkenning verða at senda til FORCE Teknisk-Audiologisk Laboratorium, sum vegna landslæknan góðkennir privatar veitarar av hoyritólum, sbrt. ásetingunum í §§ 3-7 í skjali 1.

Stk. 3. 2) Privati veitarin rindar útreiðslurnar av góðkenning og eftirliti hjá FORCE.

§ 11. Privatur veitari av hoyritólum skal kunna brúkaran um, at treytin fyri at fáa stuðul eftir § 4, stk. 1 er, at brúkarin er vístur til viðgerð við hoyritóli av serlækna í oyra-, nøs- og hálssjúkum.

Stk. 2. Privatur veitari av hoyritólum skal innan viðgerð tryggja, at brúkarin hevur fingið stuðul játtaðan frá Landssjúkrahúsinum.

## Kapittul 5

## Umbýti og leiðbeining

§ 12. Brúkari, ið fær útvegað hoyritól sbrt. § 3 ella § 4, hevur rætt til innan 4 vikur frá móttøkuni at fáa annað hoyritól í staðin, um fyrra tólið ikki hóskar til viðkomandi.

§ 13. Hoyriklinikkin á Landssjúkrahúsinum og góðkendur privatur veitari av hoyritólum hava skyldu til at leiðbeina brúkaran í at nýta hoyritólið.

Stk. 2. Hoyriklinikkin og góðkendur privatur veitari skulu leiðbeina brúkaran um treytirnar sbrt. § 7.

Kapittul 6

## Kærumyndugleiki

§ 14. 2) Avgerðir tiknar sambært §§ 3, 4 og 6 kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at umsøkjarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Stk. 2. Kærunevndin kann víkja frá freistini í stk. 1, um serlig orsøk er til tað.

Kapittul 7

## Gildiskoma

§ 15. Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2009.

Almannamálaráðið, 11. november 2008

Rósa Samuelsen (sign.)

landsstýrismaður

Eyðun Mohr Hansen (sign.)

Undirskrift

# FYLGISKJAL 5

| | |
|---|---|
| Fært tú alt við í gerandisdegnum? Alt av týdningi? | Nei ikki altíð.<br><br>Tað kann vera ringt og tað kann vera lætt. Eg hoyri ikki altíð alt, sum lærarin sigur.<br><br>Sama hvat tað er, so fái eg ikki alt við.<br><br>Eg veit jú ikki, viss eg ikki fái tað við.<br><br>NEI! Flennir … oyjøssus tað fer nógv forbí meg ella mítt høvd.<br><br>Nei slett ikki. Eg fái ræðuliga lítið, altso, eg fái ongantíð alt við.<br><br>Nei, slett ikki, tú ert ikki ordiliga við, tú veitst ikki ordiliga, hvat fólk snakka um longur. Allastaðni, har tað er larmur, har eri eg slett ikki við.<br><br>Ja, tað haldi eg eg geri.<br><br>Nei, og tað er øgiliga keðiligt, tá tú er millum fólk og í selskapi og at sita og siga ha? ha? ha? alla tíðina …<br><br>Ja, tað gera eg, nú mann hevur hoyritól fær mann alt við.<br><br>Ja! |
| Fær tú alt við í útvarpi/sjónvarpi? | Ja!<br><br>Ja, eg haldi at føroyskar sendingar eru rímiligar at fylgja við, viss tað ikki er ov nógvur bakgrundslarmur.<br><br>Ja, tað er so ótrúliga smart við internetinum í dag. Tú kanst koma afturumaftur við øllum. Tíðindini, um tú missir tey, so veitst tú, at tú kanst hoyra tey ein hálvan tíma seinni, og tá fer tað beint inn í oyrað, viss tú hevur tær røttu greiðurnar. Internetið er eitt vælsignilsi fyri fólk, ið hoyra illa, ella yvirhøvur.<br><br>Nei, eg hoyri ikki nóg væl, eg havi hetta her, at viss tað koma for nógv ljóð, so loypir tað saman. So fái eg ikki alt við. Nei, tað glippar, eg hoyri ikki nóg væl, nei, ikki uttan at tað verður tekstað.<br><br>(og útvarpið, hoyrir tú tað?) Nei, tað hoyri eg ikki, men maðurin, um hann nú lurtar eftir útvarpi, so sigur hann mær.<br><br>Ja, tað haldi eg.<br><br>Nei, tað er einki problem, eg havi nakrar oyrabúffar og teir hjálpa øgiliga væl.<br><br>Viss fleiri snakka, so fái eg einki við. |

| | |
|---|---|
| Hugsar tú um, hvørt sendingar í sjónvarpi hava tekst ella ikki? | Tá tað er tekstur, so kann eg lesa, hvussu fólk eita.<br><br>Eg klári ikki at lesa undirtekstin allíkavæl.<br><br>Tað er ordiliga keðiligt, at eingin tekstur er á, kanska serliga í skúlanum. Tá siga hini øh nei, ikki koyra tekst á, tað forstýrar og sovorðið.<br><br>Føroyskar sendingar hyggi eg heldur ikki at, tí tað ikki er tekstað.<br><br>Tú kanst kanska fáa tað tekstað dagin eftir á eini teldu hjá tær sjálvum. OK, tað er betri enn einki. Tekstur er ein stór mangulvøra í Føroyum. So viðhvørt, so hava tey, til dømis løgmansrøðan og sovorðið, tá hava tey haft tíð, ella tá tú hyggur á ólavsøku, tá fært tú eina fína røðu við teksti. Tá følir tú teg ordiliga wauw. Hetta er ein ordiligur lætti at síggja. Tað er fantastiskt at síggja føroyskan tekst til eina sending. Tað er næstan forkunnugt, tí tað er so lítið av tí. Eg meini, at alt, sum ikki er beinleiðis av tí, sum sjónvarpi ger, tað eigur at vera tekstað. Tað er for vánaligt, at tey kunnu hava produktión í fleiri mánaðir, og so kemur tað út uttan tekst. Eg eri komin til ein slags aksept, men sjálvandi gleðist eg um, tá eg kann hava tekst á, serliga viss tað er tað føroyska, ið verður tekstað.<br><br>Nei, eg hugsi ikki so nógv um tað.<br><br>Nei, tað ger ongan mun. Eg haldi, teksturin er so skjótur at mann fær ikki lisið hann allíkavæl.<br><br>Nei, tað ger ongan mun. |
| Hevur tú nýtt skrivitulk? | Nei-nei-nei-nei-nei-nei-nei-nei!<br><br>Ja, tá eg gekk í handilsskúla, viðkomandi var ikki útbúgvin, so tað var ikki nóg gott. Havi haft skrivitulk til brúdleyp, tað er nógv betur, tí tá fær mann okkurt við. Tað er nógv betur at fáa okkurt við enn einki. Altso tað er meiri tað, at mann er ein partur av felagsskapinum, og ja, mann blívur glaður, og eg føli meg … ja, betur til pass og ikki so kedd. Men eg eri stadigvekk soleiðis, at eg vil hava meira við.<br><br>Ja, tað havi eg nakrar ferðir. Tað er grúiliga gott. |
| Hugsar tú um, hvussu tú sjálv/sjálvur kanst bøta um hoyriviðurskifti hjá tær í gerandisdegnum? | Nei ikki so ofta.<br><br>Nei.<br><br>Ja, eg geri tað at … tá eg komi frá arbeiði, so taki eg hoyritólini úr eina løtu og slappi av, soleiðis at eg kann hoyra, tá familjan kemur heim.<br><br>Eg hugsi nógv um tað, sum forstýrar. Radio í bakgrundini ella musikk, viss tað er onkur larmur. Viss børn spæla. Viss hundurin gongur aftur og fram, so ljóðar tað klikk- klikk. Ja, sórit har, tað forstýrar.<br><br>Ja, tað havi eg nakrar ferðir. Tað er grúiliga gott.<br><br>Flennir, ja tað geri eg ofta, tað er hetta við at brúka hoyritólini.<br><br>Eg hugsi, at eg burdi brúkt hoyriapparatið í dag, men annars ikki, nei!<br><br>Nei, tað síggi eg ikki, tað er nakar møguleiki. Nei, tað veit eg ikki, hvussu tað skuldi verið. |

| | |
|---|---|
| Eru mannagongdir, ið tryggja, at tú fær alt við, so at tú kanst javnmetast við hoyrandi í arbeiði/skúla | Nei, eg eri líka sum hini, eg eri ikki í einum serflokki.<br><br>Altso, at hyggja upp á fólk, tá tey tosa. Tá mann ikki fær okkurt við, so at spyrja uppaftur.<br><br>Nei, tað er ikki.<br><br>Nei, mamma hevur nokkso ofta verið tann, sum sigur tað við meg, bara fyri at sikra sær, at eg fái tað við, til dømis at lærarin sigur, at í morgin skulu tit ikki í skúla, og so møti eg upp allíkavæl, tí tað hevði eg ikki fingið við. Tað er hent sooo ofta.<br><br>Nei, tað veit eg ikki, hvussu eg skal svara upp á tað. Eg havi líkasum longu vant meg við tað. Tað einasta, eg sakni við ikki at hoyra ordiliga, tað er at kunna tosa við ommubørnini. |
| Hvørs ábyrgd heldur tú, tað er, at tú fær alt við? | Eingin, kanska eg. Í skúlanum eru tað lærararnir.<br><br>Tað havi eg jú sjálv.<br><br>Tað eru báðir partar, rokni eg við.<br><br>Tað er mín egna ábyrgd.<br><br>Eg hugsi, tað eri eg. Eg royni at fylgja við. So havi eg eisini fingið hoyritól, sum hjálpa mær.<br><br>Tað er einki at tosa um, tað er mín egna ábyrgd. Tað kann ikki vera nakar annar enn ein sjálvur.<br><br>Tað trúgvi eg ikki er nakar annar enn eg sjálvur. |

HOYR

sjúkrakassa
grunnurin